Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	29. sept 2025
Mál nr.:	23/11839
Málsviðgjørt:	BÁT/HP
Ummælistíð:	12. august 2025 til 9. september 2025
Eftirkannað:	22. sept. 2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. og løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar
(Ásetan av pensjón eftir forvunnari inntøku undanfarnar mánaðir, innvinnan av pensjónsrætti, tillaging av rætti til pensjón í sambandi við deyða o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 117, frá 9. desember 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 10, stk. 4 verður "forsorgar- ella barnaforsorgarlóggávuni" broytt til: "løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ella løgtingslóg um barnavernd".

2. Í § 17 verður sum stk. 2 sett: "*Stk. 2.* Í uppgerðini av bústaðartíðini sambært stk.1, verða tíðarskeið ikki tald við í tann mun, at sosial pensjónsrættindi samstundis eru forvunnin uttanlands."

3. § 18 verður orðað soleiðis:

"**§ 18.** Hesar upphæddir verða útgoldnar uttan mun til inntøkugrundarlagið hjá pensjónistinum:
1) Grundupphædd til fólkapensjónist føddur áðrenn 1. januar 1953,
2) avlamisviðbót sambært § 2, stk. 3,
3) viðbøtur sambært § 2, stk. 5, nr. 1-3, og
4) avlamisveiting.

Stk. 2. Hesar upphæddir verða roknaðar eftir inntøku sambært reglunum í § 19:
1) Grundupphædd til fólkapensjón hjá persóni, ið er føddur eftir 31. desember 1952,
2) grundupphædd til fyritíðarpensjón,
3) viðbót sambært § 2, stk. 2, og
4) eyka viðbót sambært § 2, stk. 4."

4. Í § 19 verða stk. 1 og 2 orðað soleiðis:

"Hjá pensjónisti, føddur áðrenn 1. januar 1953, lækkar viðbótin við 20% av inntøkugrundarlagnum sambært § 20.
Stk. 2. Hjá pensjónisti, føddur aftan á 31. desember 1952, lækkar grundupphæddin til fólkapensjón við 20% av inntøkugrundarlagnum sambært § 20. Lækking av viðbót verður gjørd í framhaldi av lækkingini av grundupphæddini við 25%."

5. Í § 20, stk. 1 verður "seinast uppgjørda" strikað.

6. § 20, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2*. Afturat inntøkuni sambært stk. 1 skulu leggjast leiguinntøkur sambært § 8 a í løgtingslóg um áseting av skatti og nettoinntøkur, ið verða skattaðar eftir reglunum í løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi."

7. § 20, stk. 5 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 5*. Fyri A-inntøku er inntøkutíðarskeiðið, sum pensjón verður grundað á, inntøkan seinastu 12 mánaðirnir undan pensjónsútgjaldi. Fyri B-inntøku er inntøkutíðarskeiðið, ið pensjón verður grundað á, inntøkan seinasta álíknaða inntøkuár. Hevur pensjónistur bæði A-inntøku og B-inntøku, verður pensjón fyrst ásett við støði í A-inntøku. Tá B-inntøkan er staðfest, verður B-inntøkan løgd aftrat, og pensjónin ásettt samsvarandi samlaðu inntøkuni frá mánaðinum eftir, at B-inntøkan er staðfest."

8. Í § 20 verður stk. 6 strikað, og í stk. 7, sum verður stk. 6, verður "stk. 1-6" broytt til: "stk. 1-5".

9. Heitið á kapitli 6 verður orðað soleiðis:

"**Ásetan, broytingar, fyrisitingarligar reglur o.a.**"

10. § 21 verður orðað soleiðis:

"**§ 21.** Pensjón verður ásett mánaðarliga. Pensjónin verður ásett eftir inntøkugrundarlagnum sambært § 20.
Stk. 2. Hevur pensjónistur A-inntøku afturat pensjónini, verður full pensjónupphædd ásett fyrsta mánaðin eftir pensjónstillutan. Eftir hetta verður pensjónin ásett mánaðarliga við støði í inntøkuni mánaðin frammanundan, umroknað til eitt 12 mánaða tíðarskeið.
Stk. 3. Hevur pensjónistur B-inntøku afturat pensjónini, verður full pensjónsupphædd ásett fram til fyrstu álíkning fyri inntøku, ið er forvunnin eftir pensjónstillutan. Eftir hetta verður pensjónin ásett í mun til seinast álíknaðu ársinntøkuna.
Stk. 4. Henda broytingar í hjúnastøðu, uppihaldsskyldu ella í øðrum viðurskiftum, ið hava týdning fyri ásetan av pensjón, verður pensjónin ásett av nýggjum galdandi frá mánaðinum eftir, at viðurskiftini eru broytt."

11. § 21 a verður orðað soleiðis:

"**§ 21 a.** Pensjón verður eftirroknað, tá inntøka pensjónistsins verður umlíknað afturvirkandi hjá TAKS ella útlendskum skattamyndugleika, og samsvar ikki er millum umlíknaðu inntøkuna og útgoldnu pensjónina í sama tíðarskeiði. Pensjón verður eisini eftirroknað, tá fullfíggjaðar inntøkuupplýsingar eru tøkar hjá persóni, har TAKS hevur ásett inntøkuna.
Stk. 2. Vísir eftirrokningin sambært stk. 1, at ein pensjónistur hevur fingið ov lága veiting, verður avlopsupphæddin útgoldin.
Stk. 3. Vísir eftirrokningin sambært stk. 1, at ein pensjónistur hevur fingið ov høga veiting, verður pensjónin frameftir ásett við støði í nýggja

inntøkugrundarlagnum galdandi frá mánaðinum eftir, at pensjónistur er endaliga umlíknaður hjá TAKS ella útlendskum skattamyndugleika. Fær pensjónistur ikki longur pensjón verður pensjónisturin kravdur eftir tí muninum, um upphæddin er omanfyri 1.500 kr."

12. § 22 verður orðað soleiðis:

"**§ 22.** Persónur, sum fær veiting eftir hesi løgtingslóg, skal boða Almannaverkinum frá einihvørji broyting í viðurskiftum, sum ætlast at hava við sær, at veitingin broytist, íroknað upplýsingar um broytingar í m.a. hjúnastøðu, uppihaldsstøðu, flyting ella andláti.
Stk. 2. Persónur, sum hevur B-inntøku, hevur skyldu at veita Almannaverkinum neyðugar upplýsingar um inntøku frá viðkomandi skattamyndugleika soleiðis, at Almannaverkið kann áseta pensjónina samsvarandi inntøkuni.
Stk. 3. Í teimum førum inntøkuupplýsingar hjá persóni við B-inntøku ikki fyriliggja áðrenn vanligu tíðarfreistirnar hjá TAKS, kann Almannaverkið áseta pensjónina eftir væntaðari inntøku. Verða neyðugar upplýsingar ikki veittar, kann Almannaverkið taka avgerð um ikki at áseta pensjón.
Stk. 4. Flytur ein pensjónistur, skal hann geva Almannaverkinum fráboðan um nýggja bústaðin."

13. Í § 23, stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Um avtala verður gjørd um hetta, ella pensjónisturin ikki setir seg ímóti tí, kann afturgjaldingin fremjast við, at ein upphædd verður drigin frá í komandi pensjónsútgjøldum til pensjónistin."

14. § 27 verður orðað soleiðis:

"**§ 27.** Rætturin til veitingar sambært hesi løgtingslóg heldur uppat við endan av mánaðinum, ið persónur doyr. Hevur pensjónistur útsett pensjón sambært § 9 a, heldur rætturin til veitingar sambært hesi løgtingslóg tó uppat dagin eftir, at pensjónisturin doyr.
Stk. 2. Í teimum førum at persónur doyr aftaná, at Almannaverkið hevur útgoldið veitingina, verður veitingin ikki kravd aftur.
Stk. 3. Rætturin til veitingar sambært hesi løgtingslóg heldur uppat við endan av tí mánaði, sum kemur aftan á mánaðin, at pensjónistur flytur av landinum, sbr. tó § 3 og § 3 b.
Stk. 4. Doyr ein giftur ella samlivandi pensjónistur, og hava bæði hann og tann eftirsitandi fingið pensjón, hevur tann eftirsitandi rætt til at fáa pensjónina og møguligu persónligu viðbótina til bústaðarútreiðslur hjá báðum tilsamans í 3 mánaðir frá endanum av tí mánaði, pensjónisturin doyr. Tó fella møguligar hjálparviðbøtur, røktarviðbøtur og barnaviðbøtur burtur sama dag, at ein pensjónistur doyr.
Stk. 5. Fyri samlivandi pensjónist er tað ein treyt fyri at fáa veiting sambært stk. 4, at viðkomandi persónur hevur fingið pensjón sum samlivandi sambært løgtingslóg um áseting av almannaveitingum."

15. § 28, stk. 1 verður orðað soleiðis:

"Fær pensjónistur, ið fær pensjón útgoldna frammanundan, varandi pláss á bústaði sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur ella løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m., fella røktarviðbótin og hjálparviðbótin burtur við endan av tí mánaði, sum kemur aftan á mánaðin, pensjónisturin flytur á bústaðin. Er pensjónin goldin afturúr, fella røktarviðbót og hjálparviðbót burtur við endan av tí mánaði, sum

pensjónisturin flytur á bústaðin, sbr. § 34, stk. 2 og 3."

16. Í § 28, stk. 2 verður 1. pkt. orðað soleiðis:
"Ásetingin í stk. 1 er eisini galdandi fyri pensjónist, sum verður innlagdur á sjúkrahús, og fyri pensjónist, sum av teimum undir stk. 1 nevndu bústøðum verður settur í røkt í privatum heimi undir umsjón av einum almennum ella alment góðkendum stovni."

17. § 28, stk. 4 verður strikað.

18. Í § 33 stk. 3 verður "lóg um almenna forsorg" broytt til: "løgtingslóg um almannatrygd og tænastur".

19. § 34 verður orðað soleiðis:

"**§ 34.** Pensjón, tillutað áðrenn 1. januar 2026, verður útgoldin frammanundan eina ferð um mánaðin. Pensjón, tillutað aftan á 31. desember 2025, verður útgoldin afturúr eina ferð um mánaðin.
Stk. 2. Persónur, ið hevur fingið tillutað fyritíðarpensjón áðrenn 1. januar 2026, og sum flytur til fólkapensjón aftan á 31. desember 2025, fær fólkapensjón útgoldna afturút. Rætturin til fyritíðarpensjón hjá viðkomandi dettur burtur við endan av tí mánaði, sum kemur aftan á mánaðin, persónurin røkkur fólkapensjónsaldri.
Stk. 3. Persónur, ið hevur útsett útgjaldið av fólkapensjón áðrenn 1. januar 2026, og sum steðgar útsetanini aftan á 31. desember 2025, fær fólkapensjón útgoldna afturúr."

§ 2

Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensiónistar, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 116 frá 9. desember 2024, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2 verður aftan á stk. 2 sum nýggj stk. sett:
"*Stk. 3.* Viðbót til ávísar pensjónistar, tillutað aftan á 31. desember 2025, verður útgoldin afturúr eina ferð um mánaðin.
Stk. 4. Rætturin til viðbót til ávísar pensjónistar heldur uppat við endan av mánaðinum, ið persónur doyr.
Stk. 5. Í teimum førum at persónur doyr aftan á, at Almannaverkið hevur útgoldið veitingina, verður veitingin ikki kravd aftur."
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 6.

2. § 3, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"Treytin fyri at fáa viðbótina er, at pensjónistur seinastu 12 mánaðirnar undan útgjaldsmánað, saman við hjúnafelaga ella samliva, ikki hevur hægri inntøkugrundarlag enn 80.000 kr., og at stakur pensjónistur ikki hevur hægri inntøkugrundarlag enn 60.000 kr."

§ 3

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2026. Tó koma § 1, nr. 5 og 7-11 og § 2 í gildi 1. januar 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Hetta uppskotið inniheldur tríggjar ymiskar broytingar, sum hava ymisk endamál, og sum ikki eru tongdar at hvørjari aðrari. Harumframt er talan um eina røð av broytingum av tekniskum slag.

Broytingarnar eru hesar:

1. Broytingar viðvíkjandi um- og eftirrokning,
2. Lóggávan verður tillagað norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd,
3. Tillaging av rættinum til pensjón í sambandi við deyða,
4. Tekniskar broytingar.

1.1.1 Um- og eftirrokning

Verandi reglur um ásetan av pensjón í mun til inntøku eru ov stirvnar. Verandi skipan hevur við sær, at fíggjarstøðan hjá borgaranum er ov lítið gjøgnumskygd, tá hesin átekur sær lønt arbeiði afturat pensjónini. Tá árið er farið aftur um, vísir tað seg, at tað eru nakrir pensjónistar, sum hava fingið ov lága pensjón og aðrir ov høga pensjón. Eisini eru pensjónistar, sum hava fingið viðbót til ávísar pensjónistar, sum teir ikki hava rætt til. Hetta tí at inntøkan, sum pensjónisturin hevur havt aftrat pensjón, hevur verið antin hægri ella lægri enn væntað. Í hesum førum verður munurin antin útgoldin ella kravdur aftur frá pensjónistinum. Serliga tá ov nógv útgoldin pensjón verður kravd aftur, kann tað kennast sum ein fíggjarligur smeitur.

KT-skipanini hjá Almannaverkinum er nú ment so mikið, at tað gevur møguleika at skipa um- og eftirrokning av pensjónum á ein smidligari hátt. Men verandi skipan við um- og eftirrokning er ásett í løgtingslógini, og tí er neyðugt at tillaga lóggávuna.

1.1.2 Lóggávan verður tillagað til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd o.a.

Tørvur er á tveimum broytingum, harav tann eina beinleiðis er tongd at norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd, og hin viðvíkur persónum, sum ikki hava vunnið fullan pensjónsrætt í Føroyum.

Soleiðis sum lóggávan er skipað, ber til at innvinna rætt til almannapensjón í Føroyum og øðrum landi samstundis fyri sama tíðarskeið. Hetta er í andsøgn við meginreglu, sum flest øll lond byggja sínar pensjónsskipanir á.

Harumframt er løgtingslógin ógreið í sambandi við rættindi til barnaviðbót til persón, ið fær brotpensjón.

1.1.3 Tillaging av rættinum til pensjón í sambandi við deyða

Ein avleiðing av hesum uppskotinum er, at hjá persónum, sum fáa tillutað pensjón aftan á 2025, verður pensjón broytt frá at verða útgoldin frammanundan til at vera útgoldin afturúr. Í tí sambandi er ætlanin at tillaga løgtingslógina í sambandi við rættindi til pensjón við deyða.

Sambært galdandi lóg heldur rætturin til pensjón uppat við endanum av tí mánaði, sum kemur aftaná mánaðin, ein pensjónistur doyr. Tað merkir, at pensjónistur fær pensjón útgoldna fyri mánaðin aftan á, at hann er deyður. Fyri at avmarka útgjøld til pensjónistar, sum eru deyðir, verður tíðarskeiðið við rætti til pensjón aftan á deyða stytt.

Broytt rættindi til pensjón í sambandi við deyða ávirka tó ikki útgjøld til eftirsitandi pensjónistar, sum fáa pensjón sambært § 27, stk. 2 í løgtingslógini. Ásetingin um rætt til pensjón til eftirsitandi verður ikki broytt.

1.1.4 Broytingar av tekniskum slag
Tørvur er á eini rød av broytingum av tekniskum slag. Talan er um:

- Einstakar ógreiðar ásetingar,
- Víst verður til lóggávu, ið er broytt ella farin úr gildi,
- Bygnaðurin í lógini verður broyttur.

Punktini omanfyri snúgva seg um at gera lógina greiðari og at fáa lógina í samsvar við galdandi praksis.

1.2. Galdandi lóggáva
Hetta uppskotið fevnir um almannapensjónir sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Orðið "almannapensjón" er eisini kent undir heitinum "sosial pensjón". Hereftir verður almannapensjón stytt til pensjón.

Pensjónir, ið løgtingslógin fevnir um, eru fólkapensjón, fyritíðarpensjón og framskundað pensjón. Harumframt fevnir løgtingslógin um ymsar viðbøtur og avlamisveiting. Reglurnar um mótrokning, umrokning og eftirrokning eru tær somu fyri tær tríggjar almannapensjónirnar, hóast at frádráttarfría inntøkumarkið og mótrokningarprosentið er ymiskt.

Uppskotið fevnir eisini um viðbót til ávísar pensjónistar sambært løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar. Viðbót til ávísar pensjónistar er ein partur av pensjónsskipanini, tó við undantaki av fólkapensjónistum føddir aftan á 1952, sum ikki hava rætt til viðbót til ávísar pensjónistar.

1.2.1 Um- og eftirrokning
Upphæddin, sum verður veitt í pensjón og í viðbót til ávísar pensjónistar, er treytað av inntøkugrundarlagnum hjá pensjónistinum. Inntøkugrundarlag er tann inntøkan, sum pensjónisturin hevur aftrat pensjón og útgjald frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum (eftir hetta nevnt AMEG).

Tað er samlaða inntøkugrundarlagið í álmanakkaárinum, ið treytar upphæddina, sum verður veitt í pensjón. Ein skiftandi arbeiðsinntøka frá mánað til mánað ávirkar sostatt ikki pensjónina. Tá árið er farið aftur um, verður inntøkan løgd saman í eitt inntøkugrundarlag, og Almannaverkið kannar tá eftir, um pensjónisturin hevur fingið tað pensjónsútgjald, sum hann sambært løgtingslógini hevur rætt til.

Í sambandi við umsiting av pensjón eru hesi hugtøk, ið hava týdning:

- Áseting av pensjón
- Umrokning av pensjón
- Eftirrokning av pensjón

Áseting av pensjón: Tá ein persónur verður pensjónistur fyrstu ferð, skal veitingin, sum viðkomandi hevur rætt til, ásetast av Almannaverkinum. Tað vanliga er, at pensjónin verður ásett við støði í væntaðari inntøku frameftir. Pensjónin verður síðani ásett árliga, og verður hon ásett eftir skattskyldugu inntøkuni seinasta uppgjørda inntøkuárið ella eftir væntaðari broyttari inntøku.

Umrokning av pensjón: Umrokning er, tá pensjónistur boðar frá inntøkubroyting, sum hevur við sær, at pensjónsveitingin broytist. Almannaverkið roknar pensjónsveitingina av nýggjum, og ein nýggj áseting av pensjónsveiting fær vanliga virkna 1. í mánaðinum eftir, at broytingin er staðfest. T.e. at umrokning kann gerast alt árið.

Eftirrokning av pensjón: Allar pensjónir verða eftirroknaðar, tá árið er liðugt. Um tað so vísir seg, at munur er á útgoldnu pensjónini og upphæddini, sum hon av røttum átti at verið, verður munurin ávikavist útgoldin til pensjónistin ella afturkravdur frá honum.

Hjá flestu pensjónistum eru inntøkuviðurskiftini so mikið støðug, at broytt áseting, umrokning ella eftirrokning ikki er viðkomandi, tá árið verður gjørt upp. Fólkapensjónistur, sum hevur inntøkugrundarlag lægri enn 61.900 kr., hevur rætt til fulla almannapensjón. Fyritíðarpensjónistur og persónur við framskundaðari pensjón, sum hevur inntøkugrundarlag lægri enn 103.200 kr., hevur rætt til fulla almannapensjón.

Tað er serliga eftirrokning av pensjón, sum pensjónistar uppliva sum eina forðing og sum ein trupulleika.

Dømi*: Ein fólkapensjónistur væntar ikki at hava arbeiðsinntøku frameftir, og tí verður pensjónsútgjaldið ásett soleiðis, at hann fær fulla fólkapensjón. Pensjónisturin fer tó kortini til arbeiðis og hevur inntøku upp á 200.000 kr. Um pensjónisturin ikki boðar Almannaverkinum frá, at inntøkan broytist, so fær hann fulla almannapensjón alt árið. Um pensjónisturin er stakur, er samlaða pensjónsútgjaldið tá 119.316 kr. Men av røttum skuldi pensjónsútgjaldið einans vera 91.696 kr., svarandi til ein mun uppá 27.620 kr., sum pensjónisturin skal gjalda aftur.*

Í teimum førum pensjónistur hevur arbeitt minni enn tað, sum liggur til grund fyri pensjónsútgjaldinum, fær hann eitt afturgjald, svarandi til tað, sum hann hevur fingið ov lítið í pensjón.

Í 2023 vóru tað 835 pensjónistar, sum í miðal vórðu kravdir eftir 6.129 kr. Tað vóru 987 pensjónistar, sum í miðal áttu 7.193 kr. til góðar.

Fortreytin fyri, at pensjónisturin fær rætt pensjónsútgjald, er, at Almannaverkið hevur rættar upplýsingar um væntaða inntøku í árinum. Broytist inntøkan í árinum – t.d. at pensjónisturin gevst at arbeiða, ella arbeiðir meira enn væntað - er neyðugt, at pensjónisturin vendir sær til Almannaverkið og boðar frá inntøkubroytingini, soleiðis at pensjónisturin fær so rætt pensjónsútgjald sum gjørligt.

Lønir og flestu almannaveitingar verða í dag rindaðar afturúr, og eru tað bara almannapensjónir, ið verða útgoldnar frammanundan. Vanliga verður pensjónin útgoldin ein av síðstu døgunum í mánaðinum galdandi fyri næsta mánað.

Fyrsta pensjónsútgjaldið verður veitt frá 1. í mánaðinum eftir, at umsóknin er játtað, tó í seinasta lagi frá 1. í fjórða mánaðinum eftir, at umsóknin er móttikin. Ein persónur, ið søkir um fólkapensjón, søkir vanliga í góðari tíð, og tískil fær hann vanliga pensjón samstundis, sum hann lýkur treytirnar (t.e. røkkur fólkapensjónsaldri). Verður hann t.d. 67½ ár tann 20. januar, hevur hann rætt til fólkapensjón frá 1. februar, sum verður útgoldin síðst í januar. Um persónurin arbeiðir í januar mánað, fær hann sostatt bæði arbeiðsløn og pensjón síðst í januar mánað.

Í sambandi við umsókn um fyritíðarpensjón er vanligt við eini ávísari viðgerðartíð. Verður umsóknin t.d. móttikin í januar og játtað í juni, so hevur umsøkjarin rætt til fyritíðarpensjón frá 1. mai. Í praksis fær hann sostatt fyrstu ferð (síðst í juni) útgoldið fyritíðarpensjón fyri mai, juni og juli mánað. Um umsøkjarin fær almannaveiting, meðan pensjónsumsóknin verður viðgjørd, fær hann tó útgoldið almannaveitingina inn til síðst í juni, og samstundis fær hann útgoldið fyritíðarpensjón fyri juli mánað.

Viðbót til ávísar pensjónistar kann veitast fólkapensjónistum, føddir áðrenn 1953, og fyritíðarpensjónistum. Treytin fyri at fáa rætt til viðbót til ávísar pensjónistar er, at inntøkugrundarlagið er lægri enn 60.000 kr. hjá støkum, og at samlivandi pensjónistar tilsamans hava inntøkugrundarlag lægri enn 80.000 kr. Viðbótin er ein skattafrí veiting uppá 704 kr. um mánaðin, svarandi til 8.448 kr. um árið.

Inntøkugrundarlagið til viðbót til ávísar pensjónistar verður roknað á sama hátt sum inntøkugrundarlagið til almannapensjón. Tað merkir, at tað er árliga inntøkan (inntøkugrundarlagið), sum er avgerandi. Tó er frádráttarfría upphæddin ymisk, sum er tann upphæddin, sum pensjónistur kann hava av inntøku, áðrenn pensjónin lækkar. Tá ein fyritíðarpensjónistur hevur árliga inntøku hægri enn 103.200 kr., og fólkapensjónistur hevur hægri ársinntøku enn 61.900 kr., byrjar pensjónin at lækka stigvíst. Frádráttarfría upphæddin til viðbót til ávísar pensjónistar er sum omanfyri nevnt 60.000 kr. fyri støk og 80.000 kr. tilsamans fyri gift og samlivandi. Men viðbót til ávísar pensjónistar kann ikki veitast lutvíst. Antin fær pensjónistur fulla ársupphædd, sum er 8.448 kr., ella fær hann onga upphædd. Er inntøkugrundarlagið bara 1 krónu hægri enn markið, missir pensjónisturin 12 mánaðargjøld á 704 kr. Markið á 60.000 kr. (ella 80.000 kr. hjá samlivandi) er í sjálvum sær ein forðing, men eisini hátturin, ið verður brúktur í sambandi við mótrokning, er ein trupulleiki fyri nógvar pensjónistar.

1.2.2 Lóggávan verður tillagað til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd o.a.

Rætturin at fáa fulla føroyska pensjón er treytaður av bústaði í danska ríkinum í 40 ár. Ein persónur, sum t.d. hevur búð í Føroyum í 30 ár, fær sostatt 30/40 av pensjónini. Tað, sum manglar í, hevur viðkomandi sannlíkt rætt til frá øðrum landi. Hetta er ein meginregla, sum flestu pensjónsskipanir í vesturheiminum eru bygdar á. Um ein persónur t.d. hevur búð lutvíst í Noregi og lutvíst í Føroyum, tá hevur viðkomandi rætt til lutvísa norska og lutvísa føroyska pensjón. Hetta verður kallað *brotpensjón*.

Almannaverkið samskiftir við pensjónsmyndugleikar í øðrum Norðurlondum, tá persónur hevur vunnið rætt til pensjón úr tveimum ella fleiri londum. Hetta fyri at fyribyrgja, at persónur fær dupulta veiting og er dupult tryggjaður.

Føroyar eru fevndar av reglunum um m.a. grundpensjón, sum eru ásettar í norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd. Sambært innganginum til norðurlendska sáttmálan er sáttmálin grundaður á meginreglur og grundleggjandi hugsanina í ES-fyriskipan 883/04 um samskipan av sosialum tryggingarveitingum. Meginreglur í hesi fyriskipan kunnu tí hava týdning fyri føroyska rættarstøðu, hóast Føroyar ikki eru limur í ES.

Fyri nøkrum árum síðani tók táverandi kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum avgerð í einum máli um brotpensjón, sum hevur við sær, at kærarin hevur rætt til fulla føroyska fólkapensjón, hóast hann sama tíðarskeið hevur vunnið sær rætt til almannapensjón úr øðrum landi. Avgerðin hevur støði í ES-fyriskipan 883/04, sum norðurlendski sáttmálin um sosiala trygd, sum nevnt er grundaður á. ES-fyriskipan 883/04 staðfestir, at tað er upp til tey einstøku londini at áseta reglur um, hvussu samanfall av veitingum av sama slagi, skulu handfarast. Føroyska almannapensjónslógin hevur ikki ásetingar hesum viðvíkjandi.

Ásetingarnar um innvinnan av pensjónsrættindum vóru upprunaliga eins í ávikavist føroysku- og donsku almannapensjónslógunum. Men danska almannapensjónslógin varð fyri nøkrum árum síðani broytt orsakað av eini líknandi avgerð frá donsku kærunevndini. Tað ber sostatt ikki til í Danmark at vinna sær rætt til almannapensjón úr tveimum ella fleiri londum fyri sama tíðarskeið.

Pensjónistur, sum hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni yngri enn 18 ár, hevur sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. rætt til barnaviðbót, sum í 2025 er 1.204 kr. um mánaðin fyri hvørt barnið. Tað er ásett í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., at barnaviðbót verður ikki roknað í brotum, og tað merkir, at antin verður full barnaviðbót veitt ella ongin.

Rættindi til barnaviðbót hjá pensjónisti, sum býr uttanlands (uttanfyri danska ríkið), og sum fær føroyska brotpensjón, eru ikki nóg greið. Upprunaliga var ásetingin umsitin soleiðis, at fekk pensjónistur barnaviðbót í bústaðarlandinum, varð ongin barnaviðbót veitt úr Føroyum, tí so er talan um dupulttrygging. Ein kærunevndaravgerð broytti tó hesa siðvenjuna, og nú verður full barnaviðbót veitt úr Føroyum, hóast pensjónisturin eisini fær barnaviðbót í bústaðarlandinum. Í nøkrum londum verður barnaviðbót veitt í brotum, sum t.d. í Noregi, og tá er tað eitt ivamál, um viðkomandi skal hava fulla barnaviðbót ella onga barnaviðbót úr Føroyum.

1.2.3 Tillaging av rættinum til pensjón í sambandi við deyða

Rætturin til veiting sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. heldur uppat við endan av tí mánaði, sum kemur aftan á mánaðin, ein pensjónistur doyr. Hetta merkir, at pensjónistur fær eitt pensjónsútgjald aftan á, at hann er deyður. Pensjónin hevur higartil verið goldin frammanundan. Vanliga verður pensjón útgoldin ein av síðstu døgunum í mánaðinum. Tað merkir, at pensjónin fyri t.d. juni mánað verður útgoldin síðst í mai. Doyr pensjónisturin t.d. 20. mai, hevur hann rætt til pensjón í juni mánað, ið sum nevnt verður útgoldin nakrar dagar aftan á andlátið.

Um so er, at skipanin verður broytt soleiðis, at pensjón verður útgoldin afturúr, og verandi áseting í § 27 í løgtingslógini verður óbroytt, fær pensjónisturin í dóminum omanfyri, tvey pensjóngjøld aftan á deyða.

Tá ein pensjónistur, ið er giftur við øðrum pensjónisti, doyr, hevur tann eftirsitandi rætt til pensjónina hjá tí deyða í 3 mánaðir aftan á andlátið. Í hesum førum verður onki pensjónsútgjald útgoldið til tann deyða, og trupulleikin omanfyri er tí ikki viðkomandi. Persónur, ið er samlivandi, og sum fær játtað pensjón aftaná 31. desember 2024, er javnsettur við giftan pensjónist, og tískil verður pensjón hjá samlivandi eisini útgoldin til samliva í sambandi við andlát (um tann eftirsitandi eisini er pensjónistur).

1.2.4 Broytingar av tekniskum slag
Løgtingslóg um almannapensjónir o.a. er ikki konsekvensbroytt í sambandi við dagføring av føroyskari lóggávu, og víst verður m.a. til lóggávu, ið er sett úr gildi. Eisini eru einstakar galdandi orðingar ógreiðar, og tørvur er tí á at tillaga løgtingslógina til galdandi praksis.

Løgtingslóg um almannapensjónir o.a. er samansett og í støðum heldur fløkt, og tí verður mett neyðugt at broyta bygnaðin í lógini fyri at gera hana lættari at lesa og skilja.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Uppskotið hevur fýra ymisk endamál, ið verða viðgjørd hvørt sær niðanfyri.

1.3.1 Um- og eftirrokning
Endamálið við at broyta skipanina við um- og eftirrokning er, at tað skal vera meira smidligt hjá pensjónistum, sum arbeiða, umframt at lætta um umsitingarliga hjá Almannaverkinum. Sambært galdandi skipan er pensjón og viðbót til ávísar pensjónistar treytað av árligu inntøkuni. Sambært galdandi skipan skal Almannaverkið, tá árið er farið afturum, kanna eftir, um pensjónisturin hevur fingið ta pensjón, sum svarar til inntøkugrundarlag hansara. Tey, sum hava fingið ov lítið útgoldið í pensjón, fáa írestandi upphæddina útgoldna. Tey, sum hava fingið ov nógv, verða kravd eftir upphæddini.

Við uppskotinum fer Almannaverkið í stóran mun at sleppa undan áseting, umrokning og eftirrokning av pensjón, og pensjónistar fara at kunna arbeiða uttan at skula hugsa um eina møguliga eykarokning seinni.

Tað er vanligt, at pensjónistar, ið røkka fólkapensjónsaldri, fara antin av arbeiðsmarknaðinum ella fara munandi niður í arbeiðstíð. Fyritíðarpensjónistar megna vanliga ikki at arbeiða, so hesir hava í flestu førum ikki arbeitt áðrenn pensjónstillutan. Teir fólkapensjónistar, ið varðveita somu inntøku, biðja helst um at útseta pensjónina. Inntøkan áðrenn fólkapensjónsaldur er sostatt ikki eftirfarandi grundarlag at áseta pensjónina eftir. Við hesum uppskoti verður pensjónin bert ásett út frá veruligu inntøkuni, ið pensjónistur hevur havt eftir pensjónstillutan.

Frameftir verður pensjónin ásett hvønn mánað við støði í inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar. Sostatt er talan um eitt slag av rullandi skipan. Tá pensjón skal útgjaldast t.d. síðst í mai mánað, verður tað inntøkan frá 1. mai árið fyri til 30. apríl (ein mánað frammanundan), sum verður tikin við í inntøkugrundarlagið.

Fyri ein nýggjan pensjónist verður tað tó soleiðis, at inntøka frammanundan pensjónstillutanini ikki telur við. Pensjónisturin fer fyrsta mánaðin altíð at fáa fulla pensjónsupphædd. Pensjónin verður rindað út samstundis, sum lønarinntøka fer gjøgnum skipanina hjá Gjaldstovuni. Tá annað pensjónsgjaldið eftir tillutan skal rindast, sæst inntøkan undanfarna mánaðin, og kann inntøkan tá takast við í inntøkugrundarlagið, og pensjónin ásetast samsvarandi.

Inntøkan fyrstu mánaðirnar verður umroknað til 12 mánaðir. T.d. um inntøkan fyrsta mánaðin er 10.000 kr., verður upphæddin umroknað til 12 mánaðir, svarandi til 120.000 kr., sum sostatt liggur til grund fyri pensjónsútgjaldinum.

Fyri pensjónistar, sum hava B-inntøku, hevur uppskotið við sær, at full pensjónsupphædd verður veitt eftir tillutan fram til at fyrsta inntøkan, ið er forvunnin eftir pensjónstillutan er endaliga álíknað. Inntøkan verður tá tikin við í inntøkugrundarlagið, og pensjónin frameftir ásett í mun til inntøkugrundarlagið. Inntøkan verður sostatt ikki mótroknað í pensjónini fyrr enn árið eftir, at hon er forvunnin.

Sjálvstøðug vinnurekandi og onnur við størri B-inntøkum kunnu við uppskotinum fáa hægri pensjón tíðarskeiðið beint eftir pensjónstillutan. Hinvegin kann pensjónin verða lægri í tíðarskeiðinum eftir, at pensjónisturin ikki longur hevur B-inntøkur. Hetta tí, at pensjónin hækkar ikki fyrr enn tað sambært TAKS er staðfest, at hann ikki longur hevur B-inntøkur.

KT-skipanin hjá Almannaverkinum kann mennast at handfara mánaðarligu ásetingina av pensjónini, soleiðis at hetta verður gjørt sjálvvirkandi. Sostatt verður ikki neyðugt, at pensjónisturin vendir sær til Almannaverkið at boða frá, hvørja ferð inntøkan broytist. Pensjónin verður ásett sjálvvirkandi.

Við verandi skipan hevur pensjónisturin í prinsippinum rætt til neyvt somu pensjónsupphædd allar 12 mánaðirnar í árinum (treytað av, at Almannaverkið hevur rættar upplýsingar um inntøku). Frameftir verður tað soleiðis, at um arbeiðsinntøkan broytist hvønn mánað, so broytist pensjónsútgjaldið eisini hvønn mánað. Men flestu førum verður talan um heilt smáar broytingar í pensjónsútgjaldinum. Og hetta er uttan, at tað er neyðugt við samskifti millum pensjónistin og Almannaverkið.

Pensjónistar, ið hava fastar inntøkur, verða ikki ávirkaðir av uppskotinum. Tó verður tað soleiðis, at tá pensjónistur, sum hevur havt fasta inntøku, steðgar at arbeiða, so hækkar pensjónin stigvíst mánaðirnar eftir, at viðkomandi er steðgaður at arbeiða. Samanborið við verandi skipan verður útgoldna pensjónin í tíðarskeiðinum eftir, at pensjónisturin er steðgaður at arbeiða, eitt sindur lægri við broyttu skipanini. Hinvegin fer pensjónisturin við broyttu skipanini, altíð at fáa fult pensjónsgjald fyrsta mánaðin eftir, at pensjónsaldurin er rokkin – eisini hjá teimum, sum arbeiða.


Niðanfyri eru nøkur dømi, sum vísa, hvussu pensjónsútgjaldið broytist við ymsum arbeiðsinntøkum – ávikavist sambært higartil galdandi skipan og sambært hesum lógaruppskoti. Dømini vísa pensjónistar, sum einans hava arbeiðsinntøkur aftrat fólkapensjón og AMEG. Frameftir fara flestu pensjónistar eisini at fáa útgjald frá eginuppspardari pensjón (sambært løgtingslóg um eftirlønir). Dømini hava einans til endamáls at vísa, hvussu pensjónsgjaldið broytist frá mánað til mánað, og fyri at gera dømini greiðari, er eginuppspard pensjón ikki tikin við. Ein møgulig eginuppspard pensjón broytir ikki, hvussu pensjónin flytur seg frá mánað til mánað.

Dømi 1
Myndin niðanfyri vísir fólkapensjón um mánaðin hjá giftum fólkapensjónisti, sum hevur havt fasta arbeiðsinntøku uppá 10.000 kr. um mánaðin. Pensjónisturin steðgar í døminum at arbeiða tann 31. des. og hevur hereftir onga arbeiðsinntøku.

Dømi: Arbeiðsinntøka í tús. kr. hjá giftum fólkapensjónisti

	jan	*feb*	*mar*	*apr*	*mai*	*jun*	*jul*	*aug*	*sep*	*okt*	*nov*	*des*
Ár 1	10	10	10	10	10	10	10	10	10	10	10	10
Ár 2	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-

Fólkapensjón um mánaðin hjá giftum pensjónisti við arbeiðsinntøku uppá 10.000 kr. um mánaðin. Pensjónisturin steðgar at arbeiða 31. des.



Myndin omanfyri vísir, at pensjónin fyrstu tíðina eftir, at pensjónisturin er steðgaður at arbeiða, er eitt sindur lægri, samanborið við verandi skipan. At pensjónisturin fyrsta mánaðin eftir, at hann hevur fingið tillutað pensjón, fær fult gjald, sæst ikki á myndini.


Munurin samanborið við verandi skipan er størri, um pensjónisturin hevur hægri inntøkur. Men her skal havast í huga, at pensjónistur, sum hevur høga inntøku, sannlíkt útsetir pensjónina. Ein persónur, sum steðgar við útsettari pensjón, samstundis sum hann steðgar at arbeiða, verður ikki ávirkaður av broytingini við um- og eftirrokning. Tá útsetanin er steðgað, er persónurin at rokna sum ein nýggjur pensjónistur, og inntøkan frá tíðarskeiðinum, meðan hann arbeiddi, verður ikki tikin við í inntøkugrundarlagið.

Dømi 2
Hjá pensjónistum, har inntøkan broytist hvønn mánað, fer pensjónin eisini at broytast hvønn mánað. Niðanfyri er eitt dømi um ein fólkapensjónist, har arbeiðsinntøkan broytist munandi frá mánað til mánað. Talvan og myndin niðanfyri vísir eitt dømi við tilvildarliga valdari arbeiðsinntinntøku (í tús. kr.). Dømið hevur einans til endamáls at vísa, hvussu pensjónin broytist, tá arbeiðsinntøkan broytist lutfalsliga nógv frá mánað til mánað.

Dømi: Arbeiðsinntøka í tús. kr. hjá giftum fólkapensjónisti

	jan	*feb*	*mar*	*apr*	*mai*	*jun*	*jul*	*aug*	*sep*	*okt*	*nov*	*des*
Ár 1	10	7	20	-	-	25	5	-	18	23	3	27
Ár 2	13	-	5	25	4	16	1	11	11	-	-	14
Ár 3	14	-	3	29	9	22	-	-	13	7	26	-

Fólkapensjón um mánaðin við støði í arbeiðsinntøku í talvuni omanfyri (giftur fólkapensjónistur)



Myndin vísir, at við verandi skipan er pensjónin neyvt tann sama allar mánaðirnar í álmanakkaárinum. Men tá inntøkan broytist frá mánað til mánað, tá er sannlíkt, at pensjónisturin sambært galdandi skipan antin hevur fingið ov nógv ella ov lítið útgoldið í pensjón, og tá fær hann antin eitt krav ella afturgjald, tá árið er farið afturum. Við hesum uppskotinum regulerast pensjónin beinanvegin. Og dømið vísir, at hóast inntøkan broytist fleiri túsund krónur frá einum mánað til tann næsta, so ávirkast fólkapensjónin einans við nøkrum fáum 100 krónum.

Dømi 3


Tað eru pensjónistar, sum ikki hava mánaðarliga inntøku, men hava eina størri inntøku einstakar mánaðir. T.d. pensjónistur, sum hevur árstíðarbundið arbeiði. Dømið niðanfyri vísir pensjónist, sum tvær ferðir um árið hevur inntøku uppá 50 tús. kr. Triðja árið gevst hann at arbeiða og fær bert løn eina ferð. Mótrokningin fer at hátta seg øðrvísi samanborið við verandi skipan, men samanumtikið verður lítil munur á útgjaldinum av pensjón. Í nøkrum førum verður pensjónsútgjaldið eitt sindur lægri og í øðrum førum eitt sindur hægri.

Eru inntøkurnar regluligar (t.d. ein pensjónistur, sum hvørt ár fær 50.000 kr. tvær ferðir um árið), so er ongin munur á árliga útgjaldinum av almannapensjón.

Dømi: Ógiftur fólkapensjónistur við inntøku á 50 tús. kr. tvær ferðir um árið, og onga inntøku aftan á januar í ár 3

	jan	*Feb*	*mar*	*apr*	*mai*	*jun*	*jul*	*aug*	*sep*	*okt*	*nov*	*des*
Ár 1	50	-	-	-	-	-	-	-	50	-	-	-
Ár 2	50	-	-	-	-	-	-	-	50	-	-	-
Ár 3	50	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-

Pensjón um mánaðin við støði í arbeiðsinntøku í talvuni omanfyri (ógiftur fólkapensjónistur)



Myndin omanfyri vísir ein fólkapensjónist, sum hevur eina lutfalsliga stóra løn, men bara tvær ferðir um árið. Fyrsta árið er inntøkan eitt sindur hægri, og tá pensjónisturin ikki aftur fær inntøku, er pensjónin eitt sindur lægri eitt tíðarskeið aftan á.

Frameftir verður tað bert í undantaksførum, at tað verður neyðugt við eftirrokning. Tað verður bert, tá inntøkan verður umlíknað hjá TAKS ella útlendskum skattamyndugleika, at pensjónistur verður eftirroknaður. Uppskotið hevur sum nevnt við sær, at pensjón verður ásett hvønn mánað, og tað merkir, at pensjónin til ein og hvørja tíð er dagførd samsvarandi inntøkugrundarlagnum.

At pensjónin ikki verður eftirroknað við deyða, tá pensjónin steðgar, tá pensjónistur flytur av landinum, ella tá pensjónistur fer frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón, er ein liður í at gera skipanina lættari at umsita.

Uppskotið fer eisini at bøta um trupulleikarnar, sum eru við galdandi skipan í sambandi við viðbót til ávísar pensjónistar. Við galdandi skipan fær pensjónisturin antin 12 mánaða gjøld ella onki gjald. Við øðrum orðum hevur pensjónisturin antin rætt til fulla ársveiting ella onga veiting. Fer pensjónisturin bara 1 krónu upp um markið (sum fyri støk er 60 tús. kr. og 80 tús. kr. fyri gift og samlivandi), missir hann alla viðbótina, sum í ár (2025) er 8.448 kr. Frameftir verður viðbót til ávísar pensjónistar ásett mánaðarliga, og tað merkir, at pensjónisturin einans "missir" eitt mánaðargjald í senn.

Fyri at pensjónin skal ásetast so skjótt sum gjørligt, eftir at inntøkan er broytt, er neyðugt at pensjón verður goldin afturúr. T.d. tá ein persónur, sum hevur arbeitt í pensjónsárunum, gevst at arbeiða, so skal pensjónin so skjótt sum gjørligt byrja at hækka, og ein afturúrgoldin pensjón, stuðlar hesum.

At pensjónin broytist frá at verða útgoldin frammanundan til vera goldin afturúr, verður bert galdandi fyri pensjónistar, ið fáa tillutað pensjón aftaná 2025, og ávirkar tí ikki verandi pensjónistar. Nýggir pensjónistar fara frameftir at fáa fyrsta pensjónsútgjaldið ein mánað seinni. T.d. ein persónur, sum verður 67½ ár í januar mánað, fær í dag fyrsta pensjónsútgjald síðst í januar, galdandi fyri februar. Frameftir fer viðkomandi at fáa pensjónsútgjaldið síðst í februar, galdandi fyri februar.

Persónur, ið flytur frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón, fer at fáa fyritíðarpensjón ein mánað longur. Um fyritíðarpensjónistur verður 67½ ár í januar mánað, fær hann sambært higartil galdandi skipan fyritíðarpensjón útgoldna síðst í desember, galdandi fyri januar. Síðst í januar fær viðkomandi fólkapensjón, galdandi fyri februar. Frameftir fær hesin persónurin síðsta útgjald av fyritíðarpensjón síðst í januar galdandi fyri februar, og síðst í februar fær hann fólkapensjón, eisini galdandi fyri februar. Talan er um eina skiftisreglu, sum ger, at fyritíðarpensjónistar, sum flyta til fólkapensjón, fáa bæði fyritíðarpensjón og fólkapensjón fyri sama mánað. Men í praksis verður tað ein mánaði millum útgjøldini, og í so máta, fer pensjónisturin ikki at fáa ágóða av skiftinum.

Umleið 70-75 % av øllum fyritíðarpensjónistum fáa hægstu fyritíðarpensjón. Hægsta fyritíðarpensjón er nakað hægri enn fólkapensjón (íroknað útgjald frá AMEG) aftan á skatt og gjøld, og tí er tað ein fíggjarligur fyrimunur fyri hesi at fáa fyritíðarpensjón ein mánað longur. Miðal- og lægsta fyritíðarpensjón er eitt vet lægri enn fólkapensjón, og tí er tað ein vansi fyri hesi, at fáa fyritíðarpensjón ein mánað longur. Men hinvegin skal havast í huga, at sambært verandi løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn verður útgjald frá AMEG goldið frammanundan, og fyrstu ferð fyri tann mánaðin persónur verður fólkapensjónistur. Tað merkir sostatt, at AMEG verður útgoldin tveir mánaðir áðrenn útgjald av fólkapensjón.

B-inntøkur verða ikki kelduskattaðar, og tískil ber ikki til at gera skipanina eins einfalda og gjøgnumskygda fyri B-inntøkur. Hesar inntøkur eru ikki endaliga kendar, fyrr enn tær eru endaliga uppgjørdar. Ársuppgerðin hjá TAKS er vanliga tøk í mars mánað á hvørjum ári.

Hevur pensjónistur B-inntøkur aftrat pensjónini, verður skipanin eins og í dag. Pensjónin verður ásett við støði í forvunnari inntøku seinast uppgjørda inntøkuár. Tá hesar inntøkur eru kendar verða tær tiknar við í inntøkugrundarlagið, og pensjónin verður tá ásett við støði í hesum inntøkum. Ein persónur, sum B-inntøku í inntøkugrundarlagnum, fer frameftir at fáa fulla pensjón inn til fyrsta inntøkuárið er uppgjørt.

Eitt høvuðsendamál við uppskotinum er sum nevnt at gera skipanina meira smidliga fyri pensjónistin og einfaldari hjá Almannaverkinum at umsita. Ein vansi kann vera, at farið verður burtur frá sera neyvu ásetingini, sum er í verandi skipan. T.d. ein sjálvstøðugur vinnurekandi fær í dag almannapensjón, sum neyvt er í samsvar við álíknaða roknskapin fyri sama ár. Frameftir verður tað soleiðis, at ein sjálvstøðugur vinnurekandi í høvuðsheitum fer at fáa hægri pensjón eitt tíðarskeið og lægri pensjón eitt annað tíðarskeið.

1.3.2 Lóggávan verður tillagað til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd o.a.
Uppskotið hevur við sær, at tá bústaðartíðin verður gjørd upp í sambandi við umsókn um almannapensjón, telur tíðarskeið ikki við, har almannapensjónsrættindi eru forvunnin uttanlands. Hetta eru somu reglur, sum eru galdandi í flestu londum.

Ásetingarnar um innvinnan av pensjónsrætti vóru upprunaliga eins í ávikavist føroysku og donsku pensjónslógunum. Men danska pensjónslógin varð fyri gott 20 árum síðani broytt orsakað av eini avgerð frá donsku kærunevndini, ið var grundað á, at danska pensjónslógin onga áseting hevði um, hvussu samanfall av veitingum av sama slagi, skuldu handfarast (Lov nr. 319 af 05/05/2004). Í dag ber sostatt ikki til í Danmark at vinna sær rætt til almannapensjón úr tveimum ella fleiri londum fyri sama tíðarskeið.

Føroyska almannapensjónslógin hevur ikki ásetingar hesum viðvíkjandi. Kærunevndin í almanna-, heilsu- og familjumálum hevur í 2019 broytt eina avgerð hjá Almannaverkinum í sambandi við eitt mál um innvinnan av pensjónsrættindum í fleiri londum fyri sama tíðarskeið (málsnr. 18/00231 hjá Føroya Kærustovni). Við hesum uppskotinum verður ein áseting sett inn í løgtingslóg um almannapensjónir o.a., sum er í samsvar við ES-fyriskipan 883/04, og sostatt fer frameftir ikki at vera gjørligt at innvinna rættindi til almannapensjón í fleiri londum fyri sama tíðarskeið. Broytingin verður ikki galdandi afturvirkandi, og rættindi verða ikki tikin frá teimum, sum hava fingið tillutað pensjón.

Pensjónistur, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, hevur rætt til eina barnaviðbót fyri hvørt barnið, men barnaviðbótin kann sambært galdandi lóg ikki veitast í brotum. Tað merkir, at pensjónistur, ið fær brotpensjón, antin fær fulla barnaviðbót ella onga barnaviðbót. Løgtingslógin ásetir ikki, nær persónurin kann fáa fulla- ella onga viðbót. Við hesum uppskotinum verður ásetingin um, at barnaviðbót ikki verður veitt í brotum, strikað, og harvið verður lógin greiðari.

1.3.3 Tillaging av rættinum til pensjón í sambandi við deyða
Sambært verandi skipan fellur rætturin til pensjón burtur við endan av mánaðinum, sum kemur aftan á, at pensjónistur doyr. Pensjón er útgoldin mánaðin frammanundan. Tað merkir, at pensjón fyri t.d. mai verður útgoldin síðst í apríl. Um so er, at pensjónisturin doyr í mai mánað, hevur hann rætt til pensjón inn til endan av juni (sum verður útgoldin síðst í mai). Og í hesum døminum merkir tað sostatt, at hann fær eitt pensjónsútgjald eftir, at hann er deyður. Við hesum uppskotinum verður ásetingin broytt soleiðis, at rætturin til pensjón fellur burtur við endanum av mánaðinum, sum pensjónistur doyr. Tað merkir sostatt, at tíðarskeiðið verður stytt við einum mánaði.

Hetta uppskotið hevur við sær, at tey, sum fáa tillutað pensjón aftan á 2025, fáa pensjónina goldna afturúr. Doyr ein pensjónistur við afturúrgoldnari pensjón t.d. í mai mánað, hevur hann rætt til pensjón til endan av mai, sum verður útgoldið í endanum av mai. Sostatt fær hesin pensjónisturin eins og dømi omanfyri eisini eitt útgjald eftir deyða. Um pensjónisturin, sum doyr í t.d. mai, fær pensjónina útgoldna frammanundan, hevur hann eisini rætt til pensjón til endan av mai, sum verður útgoldin í endanum av apríl. Hesin fær sostatt onki útgjald eftir deyða.

Tað kann koma fyri, at ein pensjónistur doyr sama dag ella aftan á, at pensjónin er flutt pensjónistinum. Í uppskotinum er ein heimild sett inn um, at pensjónin í hesum førum ikki verður kravd aftur. Hendan ásetingin hevur til endamáls at lætta um umsitingarliga. At krevja

ov nógv útgoldna pensjón aftur frá einum búgvi hevur við sær ein umsitingarligan kostnað, sum ikki stendur mát við tað, sum fæst burturúr fyri landskassan.

Sambært galdandi lóg er tað soleiðis, at tá pensjónistur, ið er giftur við øðrum pensjónisti, doyr, tá hevur tann eftirsitandi rætt til pensjónina hjá tí deyða í 3 mánaðir aftan á andlátið (hetta er eisini galdandi fyri samlivandi pensjónistar, sum hava fingið tillutað pensjón aftaná 31. desember 2025). Hetta verður ikki broytt við hesum uppskotinum, og broytingin ávirkar sostatt ikki tey, sum fáa útgoldið pensjón hjá deyðum hjúnafelaga/samliva.

1.3.4 Broytingar av tekniskum slag

Endamálið við teknisku broytingunum er at tillaga løgtingslógina til galdandi lóg og at gera løgtingslógina greiðari og lættari at lesa.

Í verandi lóg verður víst til lóggávu, sum er sett úr gildi, og tað verður víst til lóggávu, har skeivt heiti verður brúkt. Eisini verða ymsar ásetingar fluttar soleiðis, at betri samanhangur verður í løgtingslógini, og løgtingslógin verður lættari at lesa, eins og einstakar ásetingar verða gjørdar greiðari og tillagaðar galdandi praksis.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær fýra yvirskipaðar broytingar, harav tann eina er av tekniskum slag og ikki ávirkar rættindi ella skyldur hjá pensjónistum. Broytingarnar eru hesar:

- Um- og eftirrokning: Í staðin fyri at almannapensjón verður roknað við støði í inntøku í álmanakkaárinum, verður pensjón frameftir grundað á inntøku undanfarnu 12 mánaðirnar. Tað sama verður galdandi fyri viðbót til ávísar pensjónistar. Ein avleiðing av broytingini er, at pensjón fer frá at verða útgoldin frammanundan til at verða goldin afturúr.
- Løgtingslógin verður tillagað til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd. Við hesum uppskoti fer ikki at bera til at innvinna rætt til almannapensjón í fleiri londum fyri sama tíðarskeið. Harumframt fer pensjónistur, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis barni, og sum fær brotpensjón, at fáa barnaviðbót í brotum.
- Rætturin til almannapensjón steðgar við endan av tí mánaði, sum pensjónisturin doyr. Sambært galdandi lóg dettur rætturin til pensjón burtur við endanum av tí mánaðinum, sum kemur aftan á, at pensjónisturin doyr.
- Broytingar av tekniskum slag, sum ikki fáa avleiðingar í praksis.

Í sambandi við broytingarnar í um- og eftirrokning verður neyðugt at gera fylgibroytingar í løgtingslóg um áseting av almannaveitingum. Upphæddir í løgtingslóg um áseting av almannaveitingum, sum vísa til løgtingslóg um almannapensjónir o.a., eru ásettar sum ársupphæddir. Hesar skulu broytast til mánaðarligar upphæddir. Parturin um um- og eftirrokning í hesum lógaruppskoti kemur í gildi 1. januar 2027.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð lagt alment til ummælis á ummælisportalinum hjá Føroya landsstýri tann 12. august 2025. Harumframt fingu hesi uppskotið til hoyringar:

Almannaverkið
Antares
Etiska ráðið
Fíggjarmálaráðið
Føroya Arbeiðsgevarafelag
Kommunufelagið
Kommunala arbeiðsgevarafelagið
Landsfelag Pensjónista
MEGD
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Sosialráðgevarafelag Føroya
TAKS
Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Føroya Arbeiðsgevarafelag, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark hava sent Almanna- og mentamálaráðnum ummælisskriv, har tey boða frá, at tey ikki hava viðmerkingar til lógaruppskotið.

Landsfelag Pensjónista og Almannaverkið hava sent Almanna- og mentamálaráðnum viðmerkingar til lógaruppskotið.

Landsfelag Pensjónista tekur undir við uppskotinum men mótmælir, at útgjald av pensjón verður broytt frá at verða goldin frammanundan til at vera goldin afturúr, tí eftirsitandi hava útreiðslur til jarðarferð o.a. og mótmælt verður, at pensjónstíðarskeiðið verður stytt við einum mánað. Landsfelag Pensjónista mælir til, at lógaruppskotið verður avmarkað til tað upprunaliga endamálið, sum er at pensjónistar skulu sleppa undan eftirrokningum.

Almanna- og mentamálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at sambært galdandi lóg er tað soleiðis, at tá pensjónistur, ið er giftur við øðrum pensjónisti, doyr, hevur tann eftirsitandi rætt til pensjónina hjá tí deyða í 3 mánaðir aftan á andlátið (hetta er eisini galdandi fyri samlivandi pensjónistar, sum hava fingið tillutað pensjón aftaná 31. desember 2025). Hetta verður ikki broytt við hesum uppskotinum, og broytingin ávirkar sostatt ikki tey, sum fáa útgoldið pensjón hjá deyðum hjúnafelaga/samliva. Harumframt er tað soleiðis, at avvarðandi hava avmarkaðar møguleikar at sleppa fram at kontum hjá tí deyða og avmarkaðar møguleikar at halda útreiðslur til ervi o.a.

Almanna- og mentamálaráðið skal eisini gera vart við at skiftið frá, at pensjón verður goldin frammanundan til at vera goldin afturúr, hongur saman við, at pensjónin skal ásetast so skjótt sum gjørligt, eftir at inntøkan er broytt. T.d. tá ein pensjónistur, sum hevur arbeitt í pensjónsárunum, gevst at arbeiða, so skal pensjónin so skjótt sum gjørligt byrja at hækka, og ein afturúrgoldin pensjón stuðlar hesum. Í hesum sambandi er avgerð eisini tikin um, at rætturin til pensjón dettur burtur við endan av tí mánaði, pensjónisturin doyr. Pensjónistur við afturúrgoldnari pensjón fer at fáa eitt pensjónsgjald í endanum av mánaðinum, sum hann doyr – júst sum í dag. Pensjónistur við pensjón, goldin frammanundan, hevur eisini rætt til pensjón til endan av mánaðinum, sum hann doyr. Men síðsta pensjónsgjaldið er útgoldið frammanundan, og tí steðgar útgjaldið ein mánað fyrr samanborið við higartil galdandi pensjón.

Landsfelag Pensjónista vísir á, at uppskotið hevur við sær eina sparing fyri landskassan, sum verður brúkt til annað endamál enn til pensjónistar. Landsfelagið vísir á, at sparingin í staðin kann fáast til vegar við at strika mótrokning í sambandi við arbeiðsinntøku. **Almanna- og**

mentamálaráðið skal í hesum sambandi gera vart við, at endamálið við uppskotinum fyrst og fremst er at fáa eina smidliga og gjøgnumskygda skipan. At útreiðslurnar skulu lækka er ikki eitt endamál í sjálvum sær.

Almanna- og mentamálaráðið metir samanumtikið ikki, at viðmerkingarnar frá Landsfelag Pensjónista eru orsøk til at gera broytingar í lógaruppskotinum.

Almannaverkið hevur nakrar lógartekniskar og málsligar viðmerkingar, ið eru tiknar til eftirtektar. Harumframt viðmerkir Almannaverkið, at tað kann koma fyri, at tað er pensjónistur, sum orsakað av viðurskiftum, sum hann ikki sjálvur hevur ávirkan á, ikki kann staðfesta endaligu inntøkuna innanfyri vanligu freistirnar. Almannaverkið skjýtur upp at áseta eina heimild, at pensjónin kann ásetast eftir væntaðari inntøku. **Almanna- og mentamálaráðið** hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri landið.

2.1.1 Um- og eftirrokning
Uppskotið hevur fyrst og fremst við sær, at útreiðslurnar til pensjón lækka orsakað av, at útgjald av pensjón fyri nýggjar pensjónistar verður broytt frá at verða útgoldið frammanundan til at verða útgoldið afturúr. Tað sama verður galdandi fyri viðbót til ávísar pensjónistar.

Tað eru umleið 550-600 persónar, sum blíva fólkapensjónistar um árið, og sum fara at fáa fólkapensjón ein mánað seinni enn í dag. Av hesum eru umleið 150 persónar, ið útseta pensjónina. Men broytingin ávirkar eisini persónar við útsettari pensjón, og tí verða tað allir nýggir fólkapensjónistar, sum verða ávirkaðir. Leysliga mett fara útreiðslur til fólkapensjón av hesi orsøk at lækka við 3,5 til 4 mió. kr. árliga.

Broytingin ávirkar eisini nýggjar fyritíðarpensjónistar, pensjónistar við framskundaðari pensjón og avlamisveiting. Tað eru umleið 200 játtanir av fyritíðarpensjón og framskundaðari pensjón um árið, sum fara at fáa pensjónsútgjald ein mánað seinni. Leysliga mett fara útreiðslur til fyritíðarpensjón at lækka við umleið 2,5 mió. kr. árliga.

At pensjón verður útgoldin afturúr hevur við sær, at fyritíðarpensjónistar, sum flyta til fólkapensjón, fara at fáa fyritíðarpensjón ein mánað longri enn í dag. Fyritíðarpensjón er dýrari fyri landskassan, og tí fara útreiðslur til fyritíðarpensjón at hækka. Tað eru umleið 150 persónar, sum árliga flyta frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón, og tað hevur við sær, at útreiðslurnar til fyritíðarpensjón hækka við umleið 900 tús. til 1 mió. kr. Harumframt lækka útreiðslurnar til viðbót til ávísar pensjónistar við uml. 150 tús. kr. árliga.

Pensjónistar, sum arbeiða, fara at fáa eitt sindur minni í pensjón fyrstu tíðina eftir, at tey gevast at arbeiða. Hinvegin fara hesir pensjónistar at fáa fult útgjald fyrsta mánaðin eftir, at tey hava rokkið fólkapensjónsaldri.

Eisini pensjónistar, sum einans hava B-inntøku, fara frameftir at fáa fulla pensjón fyrsta árið, fram til fyrstu álíkning. Pensjónin verður tá lægri frameftir. Um so er, at pensjónisturin tá gevst við sínum virksemi og B-inntøkan lækkar, so gongur ein tíð, til pensjónin aftur verður javnað.

At farið verður til eina rullandi skipan við mótrokning hevur samanumtikið ikki við sær týðandi fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan. Pensjónsgjøldini flytast eitt sindur aftur og fram – fyri nøkur verður tað í eitt tíðarskeið ein fíggjarligur fyrimunur og fyri onnur kann tað í eitt tíðarskeið vera ein vansi.

At pensjón hjá pensjónistum við B-inntøkum verður ásett við fullari pensjónsupphædd fram til seinast álíknaða inntøkan er staðfest, kann í einstøkum førum hava við sær neiligar fíggjarligar avleiðingar fyri landið. Tað er í teimum førum, at pensjónisturin doyr, áðrenn pensjónin verður ásett sambært staðfestari inntøku.

Eitt høvuðsendamál við broytingini við um- og eftirrokning er, at tað skal vera smidligari hjá pensjónistum at arbeiða, og tað kann vera viðvirkandi til, at pensjónistar fara at arbeiða meira enn í dag. Hetta ber tó ikki til at meta um.

2.1.2 Lóggávan verður tillagað til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd o.a.
Uppskotið hevur við sær, at nakrir persónar ikki fara at fáa rætt til fulla almannapensjón í Føroyum, og harvið verða útreiðslur landskassans eitt vet lægri, enn tær annars høvdu verið. Talan er um teir persónar, sum hava innvunnið rætt til almannapensjón í Føroyum og útlondum fyri sama tíðarskeið.

Talið av persónum, sum tað snýr seg um, er ikki kent, og tí ber ikki til at meta um fíggjarligu avleiðingarnar. Men talan er um avmarkaðar upphæddir – serliga fyrstu árini, tí uppskotið hevur ikki afturvirkandi virknað, og tí fara verandi pensjónistar ikki at verða ávirkaðir av broytingini.

At pensjónistar, sum fáa føroyska brotpensjón, frameftir fara at fáa barnaviðbót í brotum hevur somuleiðis avmarkaðar fíggjarligar avleiðingar, tí tað verða bert fáir persónar, sum fara at blíva ávirkaðir.

2.1.3 Tillaging av rættinum til pensjón í sambandi við deyða
Broytingin ávirkar tey, sum hava fingið tillutað pensjón áðrenn 2026. Tey, sum fáa tillutað pensjón í 2026 ella seinni, verða ikki ávirkað av, at tíðarskeiðið verður stytt við einum mánaði. Hesi fáa pensjón útgoldna afturúr og fara tí at fáa eitt pensjónsgjald í endanum av tí mánaði, sum tey doyggja. Tað eru umleið 350-400 fólkapensjónistar, sum doyggja um árið. Av teimum, sum doyggja fyrstu árini eftir gildiskomuna av hesi lógini, fáa meginparturin allarhelst pensjón útgoldna frammanundan, og harvið fáa tey ikki pensjónsútgjald eftir deyða. Uppskotið fer sostatt fyrsta árið at hava við sær, at útreiðslur til fólkapensjón lækka við umleið 2 mió. kr. Komandi árini verða tað stigvíst færri við frammanundan goldnari pensjón, og harvið minkar sparingin fyri landskassan.

Harumframt eru umleið 30 fyritíðarpensjónistar, sum doyggja um árið, og sostatt lækka útreiðslurnar til fyritíðarpensjón við umleið 0,5 mió. kr. fyrsta árið.

2.1.4 Broytingar av tekniskum slag
Broytingarnar hava ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

Samanumtikið verður mett, at uppskotið hevur við sær, at útreiðslur landskassans lækka við leysliga mett 9-10 mió. kr. um árið. Av hesum eru uml. 8,5 mió. kr., sum útreiðslurnar lækka í 2026 til ávikavist fólkapensjón og fyritíðarpensjón og viðbót til ávísar pensjónistar. Um so er, at pensjónistar fara at arbeiða meira, enn teir gera í dag, so hevur uppskotið við sær øktar skattainntøkur til land og kommunur. Hetta ber tó ikki til at meta um.

Neyðugt verður við rættiliga umfatandi broytingum í KT-skipanini hjá Almannaverkinum í sambandi við íverksetanina av broyttu skipanini við útrokning av almannapensjón. Lagt er upp fyri hesum í løgukarminum í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2026.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur við sær eina røð av umsitingarligum batum fyri Almannaverkið. Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2.1 Um- og eftirrokning

Uppskotið hevur við sær, at umsitingin av almannapensjónum og umsiting av viðbót til ávísar pensjónistar verður munandi minni og einfaldari. Fyri flestu pensjónistar verður almannapensjónin og viðbót til ávísar pensjónistar sjálvregulerandi. Frameftir verður ikki neyðugt við áseting av pensjón, og tað verður heldur ikki neyðugt við um- og eftirrokning. Undantikin eru tey, sum búgva uttanlands og fáa pensjón úr Føroyum, har umsitingarliga byrðan verður óbroytt.

Eisini verður umsiting av B-inntøkum einfaldari. At pensjónin verður ásett við fullari pensjónsupphædd fram til, at inntøkan seinast álíknaða inntøkuár er staðfest, hevur við sær, at Almannaverkið ikki longur skal eftirrokna hesar pensjónir. Fyri Almannaverkið hevur tað við sær minni umsiting.

Í 2023 vóru 1822 pensjónistar, ið vórðu eftirroknaðir (ávikavist útgjøld og krøv).

Við hesi broyttu skipanini verður neyðugt hjá Almannaverkinum at kunna komandi pensjónistar um so vítt gjørligt at fáa arbeiðsgevarar at avrokna løn, áðrenn viðkomandi røkkur fólkapensjónsaldri. Inntøka, sum ein persónur fær útgoldið áðrenn pensjónsaldurin er rokkin telur ikki við í inntøkugrundarlagnum, tá pensjónin skal roknast. Útgoldin løn, eftir at hann hevur rokkið pensjónsaldri, telur við, tá pensjónin skal roknast.

2.2.2 Lóggávan verður tillagað til norðurlendska sáttmálan um sosiala trygd o.a.

At løgtingslógin verður broytt soleiðis, at tað ikki fer at bera til at innvinna rætt til almannapensjón fyri tíðarskeið, sum pensjónsrættindi eru innvunnin uttanlands, hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar.

At løgtingslógin verður broytt soleiðis, at barnaviðbót kann veitast í brotum, ger løgtingslógina greiðari og lættir um umsitingarliga. Men tað er bert í undantaksførum, at Almannaverkið viðger mál av hesum slag, og tí fær broytingin avmarkaðan praktiskan týdning fyri umsitingina.

2.2.3 Tillaging av rættinum til pensjón í sambandi við deyða

Broytingin hevur í sjálvum sær ikki við sær umsitingarligar avleiðingar, treytað av at ásetingin í § 27, stk. 1 eisini verður broytt sum ætlað í hesum uppskoti.

2.2.4 Broytingar av tekniskum slag

Broytingarnar av tekniskum slag hava ikki við sær umsitingarligar avleiðingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki beinleiðis avleiðingar fyri vinnuna. Tó kann uppskotið hava við sær, at pensjónistar ikki í sama mun fara at uppliva mótrokning í sambandi við arbeiði sum ein trupulleika, og sostatt kann útboð av arbeiðsmegi økjast, sum er ein fyrimunur fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær avleiðingar fyri fólkapensjónistar, fyritíðarpensjónistar og tey, sum fáa framskundaða pensjón, sum hava aðrar inntøkur enn almannapensjón. Tað verður smidligari – serliga hjá teimum sum arbeiða - tí tað slepst undan um- og eftirrokningum. Tá inntøkan broytist verður ikki neyðugt at rætta pensjónsútgjaldið, tí pensjónin og viðbót til ávísar pensjónistar verður stillað av sær sjálvum.

Uppskotið hevur eisini við sær, at pensjónin fyri nýggjar pensjónistar verður broytt frá at verða goldin frammanundan til afturúrgoldin. Hetta merkir, at tey, sum frameftir fáa tillutað pensjón, fara at fáa pensjón útgoldna ein mánað seinni samanborið við galdandi skipan. Eisini verða rættindi til pensjón í sambandi við deyða broytt.

Uppskotið hevur eisini avleiðingar fyri sjálvstøðug vinnurekandi. Ein sjálvstøðugur vinnurekandi fær í dag almannapensjón, sum neyvt er í samsvari við álíknaða roknskapin fyri sama ár. Frameftir verður tað soleiðis, at ein sjálvstøðugur vinnurekandi í høvuðsheitum fer at fáa hægri pensjón eitt tíðarskeið og lægri pensjón eitt annað tíðarskeið. Dømini kunnu tó vera sera ymisk, og tað er yvir eitt langt tíðarskeið eisini ymiskt, um tað samlað sæð er ein fyrimunur ella ein vansi fyri tann einstaka pensjónistin.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur við sær, at løgtingslóg um almannapensjónir verður tillagað norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd. Tað fer ikki longur at vera gjørligt at innvinna rættindi til almannapensjón í Føroyum og uttanlands fyri sama tíðarskeið. Harumframt verður lógin greiðari fyri tey, sum móttaka brotpensjón og fáa barnaviðbót.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið verður ikki mett at vera í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**
   Uppskotið verður ikki mett at stríða ímóti Evropeiska mannarættindasáttmálanum.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrisfólkið, stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Ja	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1 (§ 10, stk. 4)

Teknisk broyting. Forsorgarlógin er sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 72, frá 25 mai 2020 um almannatrygd og tænastur varð sett í gildi. Barnaforsorgarlógin varð sett úr gildi í sambandi við, at løgtingslóg nr. 18, frá 8. mars 2005 um barnavernd varð sett í gildi. Løgtingslóg um almannapensjónir er ikki blivin rættað samsvarandi.

Til nr. 2 (§ 17, stk. 2)

Galdandi § 3 ásetir treytir fyri at innvinna rætt til almannapensjón í Føroyum. Við hesum uppskoti verður sett eitt nýtt stk. 2, sum verður eitt undantak til stk. 1, soleiðis at tað ikki fer at bera til at innvinna dupultan rætt til almannapensjón. Ein persónur, búsitandi í Føroyum, sum umvegis t.d. arbeiði uttanlands vinnur rætt til almannapensjón í øðrum landi, fyri sama tíðarskeið, fær ikki pensjónsrætt fyri hetta tíðarskeiðið í Føroyum. Tað verður einans møguligt tilsamans at innvinna sær samanlagt 40/40 í Føroyum, ið er fult innvinningartíðarskeið.

Sambært lóggávupraksis í ES skulu reglur, ið fyribyrgja dupultum uppihaldsgrundarlagi, ásetast í nationalum reglum.

Við útland er at skilja lond uttanfyri danska ríkið sambært § 3, stk. 1, nr. 3, samanber § 16.

Til nr. 3 (§ 18)

Talan er um eina broyting, sum einans hevur til endamáls at gera løgtingslógina lættari at lesa. Ásetingin hevur ongar innihaldsligar broytingar.

Í higartil galdandi løgtingslóg um almannapensjónir o.a. hava § 18 og § 19 ásett, hvussu pensjónin verður roknað. Við hesum lógaruppskoti eru upphæddir, ið ikki eru treyaðar av inntøku, savnaðar í § 18, meðan upphæddir, sum kunnu lækka, tí pensjónisturin hevur aðrar inntøkur, eru savnaðar í § 19.

Til nr. 4 (§ 19, stk. 1 og 2)

Talan er um eina broyting, sum einans hevur til endamáls at gera løgtingslógina lættari at lesa. Ásetingin hevur ongar innihaldsligar broytingar.

§ 19 ásetir, hvussu pensjónin lækkar. Í higartil galdandi løgtingslóg um almannapensjónir o.a. hava § 18 og § 19 ásett, hvussu pensjónin verður roknað. Við hesum lógaruppskoti eru upphæddir, ið ikki eru treyaðar av inntøku, savnaðar í § 18, meðan upphæddir, sum kunnu lækka, tí pensjónisturin hevur aðrar inntøkur, eru savnaðar í § 19.

Við broytingunum verður týðuligari skilnaður millum pensjónistar føddir ávikavist áðrenn og aftan á ársskiftið 1952/1953.

Til nr. 5 (§ 20, stk. 1)
Við hesi áseting er inntøkugrundarlagið, ið pensjónin verður roknað út frá, broytt frá at vera seinast uppgjørda skattskylduga inntøkan sambært skattalógini, til frameftir at vera skattskylduga inntøkan sambært skattalógini. Skattskylduga inntøkan verður uppgjørd fyri eitt álmanakkaár í senn. Tað er sostatt ikki longur ein uppgjørd inntøka, sum liggur til grund fyri pensjónini. Pensjónin verður ásett (útroknað) á einum 12 mánaða grundarlagi í staðin fyri at verða ásett við støði í inntøkuni seinast uppgjørda inntøkuár (álmanakkaár). Tað merkir, at pensjónin hvønn mánað verður ásett við støði í seinastu 12 mánaðunum. Sí nærri undir § 1, nr. 7.

Til nr. 6 (§ 20, stk. 2)
Teknisk broyting. Við hesum uppskotinum verður "leiguinntøkur sambært § 8 a í løgtingslóg um áseting av skatti" lagt aftrat sum inntøka í § 20 stk. 2. Leiguinntøkur verða í dag tiknar við í inntøkugrundarlagið, tí tær verða skattaðar sambært løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Talan er sostatt um at tillaga løgtingslógina til galdandi praksis. Endamálið við ásetingini er at veita størri gjøgnumskygni fyri borgaran við í lógini at vísa til § 8 a í løgtingslóg um áseting av skatti.

Inntøkur, ið stava frá útleigan til bústaðarendamál, kunnu sambært § 8 a í løgtingslóg um áseting av skatti skattast á tveir hættir. Annar hátturin er við at gera eitt felag, ið leigar út. Felagið verður tá skattað á sama hátt sum onnur feløg. Hin hátturin er, tá privatpersónur leigar út, t.d. eina kjallaraíbúð í egnum húsum. Fyri privatpersón er tað bert tann parturin av inntøkuni, ið stavar frá útleigan av húsum o.tíl. til bústað, sambært § 1 í leigulógini, og sum fer upp um 100.000 kr., sum verður skattaður. Talan er tá um bruttoskatt á 25 %.

Tað er sostatt bert tann parturin av leiguinntøkuni, ið er omanfyri 100.000 kr. árliga, ið skal takast við í inntøkugrundarlagið, tá pensjón verður ásett. Hetta er eisini siðvenja í verandi skipan.

Til nr. 7 (§ 20, stk. 5)
Inntøkugrundarlag verður roknað upp á tveir mátar – ávikavist fyri A-inntøku og B-inntøku.

A-inntøka
Inntøkugrundarlagið verður roknað við støði í einum inntøkutíðarskeiði. Við hesi áseting verður nágreinað, at inntøkutíðarskeiðið, sum pensjón verður grundað á, ikki longur er seinast álíknaða inntøkuárið. Hevur pensjónistur A-inntøku aftrat pensjónini, er inntøkutíðarskeiðið, ið pensjónin frameftir verður grundað á, seinastu 12 mánaðirnir undan útgjaldsmánað.

At inntøkugrundarlagið er seinastu 12 mánaðirnar undan útgjaldsmánað merkir, at tað er inntøka inn til mánaðin frammanundan, at pensjónin verður útgoldin, sum verður tikin við. Orsøkin er, at A-inntøkan forvunnin í útgjaldsmánaðinum ikki altíð er tøk, tá pensjónin verður send til útgjaldingar. Fyri pensjón, útgoldin t.d. síðst í mai, verður tað sostatt inntøka til og við apríl mánað, sum er tikin við í inntøkugrundarlagið. Tað hevur í hesum sambandi ikki týdning, um pensjón er útgoldin frammanundan ella afturúr – sí broyting í § 34 (§ 1, nr. 19 í hesum uppskotinum).

At útgjaldsmánaðurin ikki er við í inntøkugrundarlagnum, merkir, at nýggjur pensjónistur (t.v.s. pensjónistur, sum fyrstu ferð fær pensjónsgjald) onki inntøkugrundarlag hevur í

sambandi við fyrsta pensjónsgjald. Tað hevur við sær, at pensjónisturin altíð fær fult gjald fyrsta mánaðin.

Harumframt kann pensjónin við hesum beinanvegin ásetast við støði í tí inntøku, ið pensjónisturin hevur forvunnið beint frammanundan, og skal pensjónisturin ikki bíða eftir, at forvunnin inntøka verður tikin við í inntøkugrundarlagið árið eftir.

A-inntøka er inntøka, ið er kelduskattað í Føroyum.

B-inntøka
Hevur pensjónistur B-inntøku aftrat pensjónini, er inntøkugrundarlagið, ið pensjónin verður grundað á, seinast álíknaða inntøkuárið.

B-inntøka er t.d. leiguinntøka sambært løgtingslóg um útleigan av bústøðum og inntøka frá kapitalvinningi, ið verður skattað sambært løgtingslóg um skatting av kapitalvinningi. Útlendsk inntøka er eisini roknað sum B-inntøka.

Orsøkin til, at inntøkugrundarlagið fyri B-inntøku er seinast álíknaða inntøkuárið er, at henda inntøkan ikki kann staðfestast, fyrr enn hon er endaliga uppgjørd. Ársuppgerðin frá TAKS er vanliga tøk í mars mánað árið eftir, at inntøkan er forvunnin. B-inntøka, íroknað leiguinntøka og kapitalvinningur, verður tí tikin við í inntøkugrundarlagið, ið pensjón verður grundað á frá mánaðinum eftir, at inntøkan endaliga er staðfest. Hetta er vanliga frá apríl mánað á hvørjum ári.

Av tí at inntøkur, ið eru forvunnar í útlandinum, ikki verða kelduskattaðar í Føroyum, verða hesar inntøkur ikki kendar, fyrr enn tær eru endaliga uppgjørdar.

Hjá pensjónisti, ið hevur eitt inntøkugrundarlag, ið er sett saman av A-inntøku og B-inntøku, verður pensjónin ásett mánaðarliga við støði í A-inntøku. Tá B-inntøkan er staðfest, verður B-inntøkan løgd aftrat inntøkugrundarlagnum, og pensjónin ásett samsvarandi samlaða inntøkugrundarlagnum frá mánaðinum eftir, at B-inntøkan er staðfest.

Til nr. 8 (§ 20, stk. 6 og 7)
Heimildin í § 20, stk. 6, at grunda fyrstu pensjónsútrokning á væntaða inntøku frameftir, verður strikað. Tískil verður verandi heimild í § 20, stk. 7 flutt til § 20, stk. 6.

Endamálið við lógaruppskotinum er m.a. at gera skipanina meira einfalda at umsita, og ein liður í hesum er ikki longur at áseta pensjónina út frá væntaðari inntøku. Í staðin verður fyrsta tíðin eftir pensjónstillutan soleiðis skipað, at fyrsta útgjald altíð er full pensjón, og næsta útgjald verður ásett eftir faktiska inntøkugrundarlagnum aftaná, at pensjónisturin hevur fingið tillutað pensjón. Sí nýggj áseting í § 21, stk. 2 (§ 1, nr. 10 í hesum uppskoti). Sostatt er ikki tørvur longur á at áseta pensjón sambært mettari A-inntøku.

Harumframt verður skipanin broytt, hvussu pensjón verður ásett, tá talan er um B-inntøku, íroknað inntøkur frá útleigan til bústaðarendamál sambært leigulógini og inntøkur frá kapitalvinningi. Heimildin at áseta pensjón við støði í mettari B-inntøku ella mettum kapitalvinningi verður við hesum uppskoti strikað. Sí nærri undir § 1, nr. 11.

Fyri pensjónistin hevur henda ásetingin ikki nakran fíggjarligan týdning, men verður ásett í lógina, av tí at pensjón frameftir verður grundað á forvunna A-inntøku seinastu 12 mánaðirnir undan útgjaldsmánað. B-inntøkur og inntøkur frá kapitalvinningi verða tó framvegis grundaðar á ársinntøkuna seinast álíknaða inntøkuár, men av tí, at pensjónin verður rindað út mánaðarliga, verður frádrátturin í dag eisini býttur út yvir 12 mánaðir.

Til nr. 9 (heitið á kapitli 6)

Broyting av yvirskrift er ein avleiðing av, at farið verður burtur frá árligari ásetan av pensjón. "Árlig ásetan" verður broytt til "Ásetan". Eisini er orðið "afturtøka" strikað og "fyrisitingarligar reglur" sett inn í staðin, soleiðis heitið verður meira sigandi fyri innihaldið í kapitli 6.

Til nr. 10 (§ 21)

Stk. 1

Sambært verandi lóg verða pensjónir ásettar hvønn 1. januar við gildi fyri eitt álmanakkaár. Við hesum uppskotinum verður pensjónin ásett mánaðarliga og við støði í einum skeiði á 12 mánaðir eftir inntøkugrundarlagnum, sum ásett í § 20.

Hetta merkir, at eftir pensjónstillutan og fram til fult 12 mánaða tíðarskeið verða mánaðarligu inntøkurnar frá pensjónstillutan lutfalsliga umroknaðar til eina 12 mánaða inntøku.

Við hesum uppskotinum verða pensjónir ikki longur umroknaðar í árinum, um broytingar henda í inntøkuni. Tørvur er ikki longur á at umrokna A-inntøkur, av tí at pensjónin, í einum 12 mánaða skeiði, verður ásett við støði í inntøkunum mánaðirnar frammanundan.

Fyri pensjónistar, ið hava B-inntøkur verður pensjónin heldur ikki longur umroknað í árinum, hóast inntøkan hjá pensjónistinum broytist. Broytingin í inntøkuni hevur ikki avleiðingar fyri pensjónina fyrr enn árið eftir, tá pensjónin verður ásett við støði í staðfestu inntøkuni árið frammanundan. Við hesum kann pensjónisturin fáa lægri pensjón, tíðarskeiðið aftan á eina inntøkulækking, samanborið við verandi skipan. Hinvegin hevur pensjónisturin sannlíkt hægri inntøku fyrstu tíðina aftan á pensjónstillutan.

Til stk. 2.

Hava pensjónistar somu inntøku eftir pensjónsaldur, sum teir høvdu innan pensjónsaldur, ella hava eina hægri arbeiðsinntøku, er hugsandi, at hesir nýta reglurnar um útsetta pensjón, og tá er ikki viðkomandi við áseting av pensjón.

Tað er vanligt, at pensjónistar ikki arbeiða eins nógv eftir, at pensjónsaldurin er rokkin, sum innan pensjónsaldur. Tí verður fyrsta pensjónsgjaldið eftir pensjónstillutan ikki ásett eftir A-inntøkuni, ið er forvunnin innan pensjónsaldur. Pensjónin verður bert ásett við støði í A-inntøku, ið er forvunnin eftir pensjónstillutan.

Fyrsta pensjónsgjaldið eftir pensjónstillutan verður ásett sum full pensjónsupphædd. A-inntøka verður sostatt tikin við í inntøkugrundarlagið fyri ásetan av pensjón longu frá øðrum mánaði eftir pensjónstillutan. Lønarinntøka verður goldin afturúr og kann tí ikki takast við í inntøkugrundarlagið fyrr enn annan mánaðin eftir pensjónstillutan. Av tí at pensjónin longu kann ásetast við støði í forvunnari A-inntøku annan mánaðin eftir pensjónstillutan, er ikki longur tørvur á at áseta pensjónina eftir mettari A-inntøku.

Næsta pensjónsútgjald og tey eftirfylgjandi útgjøldini verða ásett eftir inntøkuni mánaðirnar frammanundan, umroknað til 12 mánaðir.

Dømi
Ein persónur verður fólkapensjónistur og fær fulla pensjón við fyrsta pensjónsútgjald. Fyrsta mánaðin hevur hann arbeiðsinntøku á 10.000 kr., sum skal umroknast til 12 mánaðir, svarandi til 120.000 kr. Pensjónin lækkar við 20 % av inntøku hægri enn 61.900 kr., og pensjónin verður tí lækkað við 0,2 x (120.000-61.900)/12 = 968 kr.

Sum tað sæst í døminum, verður inntøkan fyrstu mánaðirnar umroknað til 12 mánaðir. Tað, sum pensjónin lækkar um mánaðin, er umroknaða upphæddin býtt við 12.

Við hesi broyttu skipanini liggur tað ein serlig ábyrgd hjá Almannaverkinum at kunna komandi pensjónistar um so vítt gjørligt at fáa arbeiðsgevarar at avrokna løn, áðrenn viðkomandi røkkur fólkapensjónsaldri. Tað er vanligt, at pensjónistar blíva avroknaðir, tá tey steðga á arbeiðsmarknaðinum. Tað kann t.d. vera frítíðarløn, yvirarbeiði o.s.fr. Havast skal í huga, at inntøkur fyrstu mánaðirnar skulu umroknast til 12 mánaðir, og tað kann sostatt merkja, at t.d. frítíðarløn skal umroknast til 12 mánaðir. Í verandi skipan verða hesar upphæddir eisini tiknar við í inntøkugrundarlagið hjá pensjónistum, og ávirka eisini pensjónsútgjaldið. Men upphæddirnar verða ikki umroknaðar til 12 mánaðir.

Allir komandi fólkapensjónistar fáa skriv frá Almannaverkinum 3 mánaðir áðrenn fólkapensjónsaldur við kunning um fólkapensjón. Í hesum skrivinum hevur Almannaverkið møguleika at kunna um týdningin av at avrokna lønarviðurskifti, áðrenn tey røkka fólkapensjónsaldrinum.

Til stk. 3.
Sambært higartil galdandi reglum kann pensjónin ásetast eftir mettari inntøku. Við hesum uppskotinum verður pensjón ikki longur ásett eftir mettari A-inntøku, B-inntøku ella eftir mettari útlendskari inntøku. Tá pensjónin ikki longur verður ásett eftir mettari inntøku men bert verður ásett eftir staðfestari inntøku, er tørvur ikki longur á at eftirrokna pensjónina í mun til veruligu inntøkurnar. Eftirrokning verður frameftir bert gjørd í sambandi við umlíkning hjá TAKS.

Við hesi áseting verður pensjónin ásett við fullari pensjónsupphædd fram til, at B-inntøka fyri seinast álíknaða inntøkuár er staðfest. Síðani verður pensjónin frameftir ásett við støði í tí staðfestu inntøkuni árið frammanundan.

Tað eru umleið 20% av øllum pensjónistum, ið hava lønarinntøku, har ið lønarinntøkan stavar frá B-inntøku. Fyri flestu av hesum pensjónistum er talan um smærri inntøkur, og eru avleiðingarnar av ásetingini tí avmarkaðar.

Fyri pensjónistin kann nýggja skipanin samanborið við verandi skipan fyri nøkur vera ein fyrimunur og fyri onnur ein vansi. Fyrimunurin er, at pensjónisturin fær fulla pensjónsupphædd beinanvegin eftir, pensjónsaldurin er rokkin. Ein vansi kann vera, at hjá pensjónistum við B-inntøkum verður pensjónin ásett frameftir við støði í inntøku aftureftir. T.d. ein pensjónistur, sum er sjálvstøðugur vinnurekandi, sum steðgar við sínum virksemi, har kann ganga nakað av tíð, til pensjónin samsvarar við hansara aktuellu inntøku.

Til stk. 4
Við hesi áseting verður staðfest, at henda broytingar í privatu viðurskiftunum, ið hava avleiðingar fyri, hvussu pensjónin verður ásett, so verður pensjónin ásett av nýggjum galdandi frá mánaðinum eftir, at viðurskiftini eru broytt. Eru viðurskiftini broytt, og Almannaverkið ikki er kunnað um broytingina, og pensjónisturin harvið hevur móttikið pensjón á skeivum grundarlag, verður munurin kravdur aftur ella útgoldin, um pensjónisturin ikki hevur fingið ta pensjón, sum hann hevur rætt til.

Broytingar, ið talan kann vera um, eru t.d. broytingar í hjúnastøðu ella samlivarastøðu ella broytingar í uppihaldsskyldu mótvegis børnum. Eisini kann talan vera um broytingar, sum hava við sær, at pensjónistur ikki longur hevur rætt til persónliga viðbót.

Til nr. 11 (§ 21 a)
Stk. 1
Sambært higartil galdandi løgtingslóg verða pensjónir hjá øllum pensjónistum eftirroknaðar, tá inntøkan er endaliga uppgjørd av skattamyndugleikanum. Hendan heimildin fellur burtur, og í staðin er nú ásett í løgtingslógina, at pensjónin bert verður eftirroknað, tá pensjónistur verður umlíknaður hjá TAKS ella útlendskum skattamyndugleika.

Í sambandi við umlíkning verður pensjónistur við A-inntøku eftirroknaður fyri eitt 12 mánaða tíðarskeið. Fyri pensjónist við B-inntøku verður persónurin eftirroknaður fyri eitt heilt álmanakkaár.

Uppskotið hevur sum nevnt við sær, at pensjón verður ásett hvønn mánað. Við øðrum orðum er pensjónin til eina og hvørja tíð dagførd. Sostatt er ikki longur neyðugt at eftirrokna við deyða, tá pensjónin steðgar, tá pensjónistur flytur av landinum, ella tá pensjónistur fer frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón.

Somuleiðis í teimum førum, at pensjónistur, har pensjónin hevur verið ásett við støði í B-inntøku, doyr, verður heldur ongin eftirrokning. Hetta hóast ein møgulig inntøkubroyting í árinum hevði havt við sær, at pensjónisturin ella landið átti pening til góðar. Undantikið er tó í teimum førum, at Almannaverkið ikki hevur havt rættar upplýsingar um viðurskifti, ið hava týdning fyri áseting av pensjón, so sum samlivarastøðu ella uppihaldsskyldu.

Til stk. 2.
Vísir ein eftirrokning, gjørd við støði í umlíkning hjá TAKS ella hjá útlendskum skattamyndugleika, at ov lítið er útgoldið í pensjón, skal tað, sum manglar í, rindast pensjónistinum. Ásetingin í stk. 2 er ikki ein broyting í mun til galdandi reglur.

Til stk. 3.
Vísir ein eftirrokning, gjørd við støði í umlíkning hjá TAKS ella hjá útlendskum skattamyndugleika, at ov nógv er útgoldið í pensjón, skal pensjónisturin rinda peningin aftur, um upphæddin, ið hann skyldar, er omanfyri 1.500 kr.

Av tí, at tað krevur fyrisitingarligt arbeiði at krevja inn skuld, so er ásett ein minsta upphædd fyri nær, Almannaverkið krevur inn skuld. Skyldar pensjónisturin meira enn 1.500 kr. verður skuldin kravd aftur, eisini tær fyrstu 1.500 kr. Skyldar pensjónistur 1.500 kr. ella minni, verður upphæddin ikki kravd aftur.

Til nr. 12 (§ 22)
Stk. 1.
Talan er um eina broyting av tekniskum slag. Tað er skoytt uppí verandi áseting dømi um tað, sum pensjónisturin hevur skyldu, at upplýsa um. Við hesi áseting verður nágreinað, at pensjónisturin hevur skyldu, at boða frá einihvørji broyting í viðurskiftum, ið kunnu hava við sær, at pensjónsupphæddin broytist ella, at rætturin til pensjón steðgar.

Hesi viðurskifti kunnu t.d. vera, at pensjónistur giftist, fær samlivandi maka ella verður fráskildur. Eisini kann uppihaldsskyldan mótvegis barni undir 18 ár steðga. Um pensjónistur flytur av landinum, kann hetta ávirka rættin til pensjón og eisini ávirka, hvørjar viðbøtur pensjónisturin hevur rætt til. Doyr hjúnafelagin ella samlivin, kann tað ávirka pensjónsupphæddina.

Heldur pensjónistur ikki sína upplýsingarskyldu soleiðis, at pensjónisturin móttekur pensjón av órøttum, kann Almannaverkið sambært § 23 krevja upphæddina afturgoldna frá pensjónistinum sjálvum ella frá deyðsbúgvinum, um hesin er deyður.

Stk. 2
Við hesum verður staðfest, at persónur, ið hevur B-inntøku, hevur skyldu at veita Almannaverkinum neyðugar upplýsingar, soleiðis at Almannaverkið kann áseta pensjónina samsvarandi inntøkuni.

Almannaverkið ger av, hvørjar upplýsingar eru neyðugar. T.d. verður pensjón hjá pensjónisti búsitandi uttanlands ásett við støði í útlendskari inntøku, og kann Almannaverkið tí hava tørv á upplýsingum frá útlendskum skattamyndugleika. Eisini kann Almannaverkið hava tørv á váttan, ið prógvar, at pensjónisturin framvegis er á lívi, tá pensjónin skal rindast uttanlands.

Tað er umráðandi, at Almannaverkið hevur víst á, júst hvørjar upplýsingar skulu veitast, og hvussu viðkomandi fær fatur á hesum upplýsingum. Eisini skal Almannaverkið kunna um, at avgerð verður tikin út frá teimum upplýsingum, ið eru í málinum, og mangla upplýsingar, kann tað hava við sær, at pensjón ikki verður ásett, smb. stk. 3.

Stk. 3
Tað eru dømi um mál, har inntøkurnar ikki kunnu endaliga staðfestast innanfyri vanligu freistirnar. Talan kann vera um viðurskifti, sum pensjónisturin ikki sjálvur hevur ávirkan á. Í hesum førum kann Almannaverkið áseta pensjón eftir væntaðari inntøku.

Eisini verður ásett í lógina, at tað kann hava avleiðingar fyri málsviðgerðina, um neyðuga upplýsingar ikki verða latnar Almannaverkinum. Sambært stk. 3 kann Almannaverkið taka avgerð um ikki at áseta pensjón, um neyðugar upplýsingar ikki verða veittar. Við øðrum orðum steðgar útgjaldið av pensjón.

Stk. 4
Teknisk broyting. Ásetingin í § 22, stk. 3 í hesum uppskotinum er sama áseting, sum er í verandi § 34, stk. 2. Mett verður, at ásetingin hóskar betur í § 22, sum annars hevur ásetingar um, at persónar hava skyldu at lata Almannaverkinum neyðugar upplýsingar og fráboða broytingar annars.

Talan er ikki um innihaldsliga broyting.

Til nr. 13 (§ 23 stk. 2)
Heldur enn at krevja allan peningin inn í einum, heimilar galdandi § 23, stk. 2 Almannaverkinum at gera eina afturgjaldsskipan, tá ið ein persónur hevur fingið ov nógv útgoldið í pensjón, tí viðkomandi ikki hevur hildið sína upplýsingarskyldu eftir § 22 ella móti betri vitan av órøttum hevur fingið veiting.

Ásetingin verður av Almannaverkinum í dag umsitin soleiðis, at hevur ein pensjonistur fingið ov nógv útgoldið í pensjón, boðar Almannaverkið viðkomandi frá í einum skrivi, at kravið fer at verða mótroknað í komandi pensjónsútgjøldum. Í skrivinum verður heitt á pensjonistin um at boða Almannaverkinum frá, um hann setir seg ímóti, at kravið verður mótroknað í pensjónsútgjaldinum. Letur pensjonisturin ikki við seg koma, verður kravið mótroknað í komandi pensjónsútgjøldum.

Ítøkiliga merkir mótrokning, at pensjónisturin, inntil ov nógv útgoldna upphæddin er afturgoldin, fær eitt lægri pensjónsútgjald, enn hann annars hevur rætt til. Hevur ein pensjonistur í 2024 fingið útgoldið 3.000 kr. ov nógv í pensjónútgjøldum, kann avtala t.d. gerast millum partarnar um at mótrokna 250 kr. í mánaðarligu pensjónsútgjøldunum í 2025.

Av tí, at galdandi lóg ikki nevnir møguleikan fyri afturgjalding umvegis mótrokning, verður tað mett skynsamt – við atliti at greidleika – at møguleikin fyri avtalaðari mótrokning verður settur beinleiðis inn í løgtingslógina.

Uppskotið til § 23, stk. 2, 2. pkt. ger tí greitt, at tá ein persónur hevur fingið ov nógv útgoldið í pensjón, kann afturgjaldingin fremjast við mótrokning, um Almannaverkið ger avtalu við pensjonistin um hetta, ella pensjonisturin ikki mótmælir einum uppskoti frá Almannaverkinum um mótrokning (tigandi avtala um mótrokning).

Uppskotið til § 23, stk. 2, 2. pkt. heimilar ikki kravdari mótrokning. Pensjonisturin kann tí altíð heita á Almannaverkið um at steðga mótrokningini, sama um hon er sett í verk við vanligari avtalu ella tigandi avtalu. Afturgjaldingin má so ístaðin fremjast á annan hátt.

Ásetingin samsvarar sum nevnt við, hvussu § 23, stk. 1 um afturgjaldsskipan í dag verður umsitin, men hevur til endamáls at tryggja eina greiðari heimild fyri afturgjalding við mótrokning.

Til nr. 14 (§ 27)
Stk. 1
Við hesum verður ásett, at rætturin til veitingar sambært hesi lóg fellur burtur frá endanum av mánaðinum, tá pensjónistur doyr. Við veitingar sambært hesi lóg er at skilja pensjón, avlamisveiting og viðbøtur. Eins og við verandi løgtingslóg er eitt undantak ásett í stk. 4 (áður stk. 2).

Í praksis merkir ásetingin, at tá ein pensjónistur doyr, sum fær pensjón goldna afturúr, sambært § 34, stk. 2 (§ 1, nr. 19 í hesum uppskotinum), so fær hann eitt pensjónsútgjald fyri tann mánaðin, hann doyr. T.d. doyr hann í mai, fær hann eitt pensjónsútgjald í endanum av mai (sum er galdandi fyri mai).

Doyr ein pensjónistur, sum fær pensjón útgoldna frammanundan, fær hann onki pensjónsútgjald í endanum av mánaðinum, sum hann doyr. Doyr hann t.d. í mai, er hansara síðsta pensjónsútgjald síðst í apríl. Tað, sum verður útgoldið síðst í apríl er galdandi fyri mai.

Hetta merkir, at doyr ein pensjónistur, áðrenn mánaðarliga pensjónin er farin til útgjaldingar, so fellur pensjónin tann mánaðin burtur. Hetta sama er galdandi fyri pensjónist, ið hevur útsett pensjónina sambært § 9 a. Veiting verður ikki útgoldin til persón, ið er deyður (eitt undantak er tó ásett í stk. 2).

Sambært § 11 í skattalógini fellur skattskyldan burtur frá tí degi, at skattgjaldari er deyður.

Ásetingin um, at rætturin til veitingar til persón við útsettari pensjón heldur uppat dagin eftir, at viðkomandi doyr, er óbroytt.

Stk. 2
Vanliga verður pensjónin útgoldin ein av síðstu døgunum í mánaðinum. Tað kunnu sostatt vera nakrir fáir dagar eftir av mánaðinum, tá pensjónin verður útgoldin. Stk. 2 ásetir, at um so er, at pensjónisturin doyr, aftan á at pensjónin er útgoldin, so verður útgoldna upphæddin ikki kravd aftur.

Í praksis hevur hendan ásetingin einans týdning fyri pensjónistar, sum fáa pensjón útgoldna frammanundan. Pensjónistur, sum fær pensjón útgoldna afturúr, hevur rætt til eitt útgjald í tí mánaðinum, sum hann doyr.

Stk. 3
Treytin fyri at fáa føroyska pensjón er m.a., at pensjónistur hevur fastan bústað í Føroyum. Flytur ein pensjónistur av landinum, so missir hann sum útgangsstøði rættin til føroyska pensjón.

Við hesi áseting verður staðfest, at pensjónisturin varðveitir rættin til pensjón í ein mánað eftir, at pensjónisturin er fluttur av landinum, um so er, at pensjónisturin ikki fær loyvi at taka pensjónina við sær av landinum.

Flytur ein pensjónistur, ið fær pensjón rindaða afturúr, úr Føroyum t.d. í februar mánað, so fær pensjónisturin sína seinastu pensjón í mars mánað, ið verður útgoldið í endanum av mars mánað.

Serligar reglur eru galdandi fyri fyritíðarpensjónistar, ið flyta innanfyri danska ríkið, t.e. til Danmarkar ella til Grønlands. Ein fyritíðarpensjónistur kann varðveita føroyska fyritíðarpensjón í upp til 12 mánaðir eftir flyting sambært § 3 b.

Flytur pensjónistur uttanfyri danska ríkið, kann pensjónisturin søkja um loyvi at fáa føroysku pensjónina við sær av landinum, sambært § 3, stk. 3, 2. pkt. Landsstýrismaðurin tekur avgerð um at loyva pensjónisti at taka føroyska pensjón við til útlandið.

Stk. 4
Ásetingin merkir, at tá ein giftur ella samlivandi pensjónistur doyr, og bæði hann og tann eftirsitandi hava fingið pensjón, hevur tann eftirsitandi rætt til pensjónina og møguliga

persónliga viðbót til bústaðarendamál hjá báðum tilsamans í 3 mánaðir frá endanum av mánaðinum, pensjónisturin doyr.

Talan er um eina konsekvensbroyting av stk. 1. Fyrsta punktum um pensjónist, ið er giftur ella samlivandi við øðrum pensjónisti, er óbroytt samanborið við verandi løgtingslóg. Annað punktum er broytt soleiðis, at møguligar viðbøtur detta burtur á sama hátt sum ásett í stk. 1.

Broytingin í § 27, stk. 1 hevur sostatt bert ávirkan á teir pensjónistar, hvørs hjúnafelagi ikki er pensjónistur ella arvingarnar hjá einum stakum pensjónisti.

Sambært § 7, nr. 2, kann miðal fyritíðarpensjón rindast einkjum og einkjumonnum við uppihaldsskyldu mótvegis børnum undir 18 ár.

Stk. 5
Stk. 5, sum áður var stk. 3, er óbroytt.

Til nr. 15 (§ 28, stk. 1)
Tekniskar broytingar, ið ikki hava avleiðingar fyri rættindi hjá borgarum.

Stk. 1.
Nýggja ásetingin í stk. 1 verður broytt samsvarandi galdandi veruleika. Nýggjar løgtingslógir eru settar í gildi, sum loysa av gomlu forsorgarlógina, og sostatt verður í hesum uppskotinum víst til núgaldandi lóggávu. Í ásetingini, sum við hesum uppskotinum verður sett úr gildi, verða brúktar orðingar, sum vóru í samsvari við forsorgarlógina, og eru tær broyttar soleiðis, at tær samsvara við verandi lóggávu.

Ásetingin um, nær hjálparviðbót og røktarviðbót fella burtur, er konsekvensbroytt í sambandi við, at pensjónsútgjald hjá nýggjum pensjónistum verður broytt frá at verða útgoldin frammanundan til at verða útgoldin afturúr (sí § 1, nr. 19 í hesum uppskoti). Broytta ásetingin hevur ikki praktiskar avleiðingar fyri pensjónistar, ið fáa hjálpar- ella røktarviðbót, soleiðis at skilja, at hjálpar- og røktarviðbót verður útgoldin síðstu ferð í endanum av tí mánaði, tá pensjónisturin flytur.

Til nr. 16 (§ 28, stk. 2)
Talan er um málsligar broytingar, ið ikki hava avleiðingar fyri rættindi hjá borgarum.

Til nr. 17 (§ 28, stk. 4)
§ 28, stk. 4 í verandi løgtingslóg um almannapensjónir o.a. ásetir, at reglur um, hvat hendir við pensjónini og um møguligt gjald fyri stovnsuppihald, tá ein pensjónistur fær uppihald á stovnum, røktarheimum o.ø. verða ásettar í serligari løgtingslóg. Ásetingin verður strikað. Ásetingin hevur ikki longur praktiskan týdning. Ásetingin er frá tí tíðini, tá borgari varð settur á stovn og fekk lummapening, sambært áður galdandi løgtingslóg um uppihald á stovni. Løgtingslógin var sett úr gildi við løgtingslóg nr. 143, frá 6. oktober 2011, og stovnshugtakið er nú tikið av fyri vaksin fólk soleiðis at skilja, at persónur, ið býr á vardum bústaði, fær eina veiting og rindar húsaleigu og rindar fyri møguligar aðrar útreiðslur, knýttar at bústaðnum.

Ásetingar um húsaleigu eru í § 47 og § 48 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og í kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a.

Børn, ið búgva á stovni, rinda ikki sjálvi fyri at búgva á stovninum.

Til nr. 18 (§ 33, stk. 3)
Ásetingin hevur til endamáls at vísa til rætta lóggávu. Talan er ikki um innihaldsliga broyting.

Til nr. 19 (§ 34)
Við pensjón í § 34 er at skilja fólkapensjón, fyritíðarpensjón, framskundað pensjón umframt viðbøtur og avlamisveiting.

Verandi stk. 2 og 3 strikað
Stk. 2 í verandi løgtingslóg er við hesum uppskoti flutt til § 22, stk. 3, har ásetingar eru um, at persónar hava skyldu at lata Almannaverkinum neyðugar upplýsingar og fráboða broytingum annars.

Stk. 3 í verandi løgtingslóg verður strikað. Samráðingarnar, sum sambært stk. 3 er álagt landsstýrisfólkinum at hava við donsku stjórnina, eru lidnar. Avtala er gjørd millum londini í ríkisfelagsskapinum um, hvussu pensjónir hjá persónum, ið flyta millum londini, skulu handfarast, og løgtingslógin er við løgtingslóg nr. 142 frá 13. desember 2019 broytt samsvarandi avtaluni. Ásetingin er tí ikki longur viðkomandi, og stk. 3 verður tí strikað.

Stk. 1
Verandi stk. 1 um, at pensjónir eru goldnar frammanundan eina ferð um mánaðin, verður ikki broytt við hesum uppskoti. Pensjónir, ið eru tillutaðar áðrenn 1. januar 2026, verða framhaldandi rindaðar mánaðarliga frammanundan. Men sett verður inn, at pensjón tillutað aftan á 31. desember 2025, verður goldin afturúr eina ferð um mánaðin.

Tey, sum fáa tillutað pensjón aftan á 2025, fáa sostatt pensjón goldna afturúr. Ein persónur, sum fær tillutað pensjón t.d. frá 1. mai, fær fyrsta útgjald í endanum av mai, galdandi fyri mai mánað.

Stk. 2
Stk. 1 ásetir, sum nevnt, at verandi pensjónistar halda fram at fáa pensjón útgoldna frammanundan. Stk. 2 er eitt undantak, sum er galdandi fyri fyritíðarpensjónistar, sum hava fingið tillutað fyritíðarpensjón áðrenn 1. januar 2026, og sum flyta til fólkapensjón aftan á ár 2025. Meðan tey eru fyritíðarpensjónistar, fáa tey fyritíðarpensjón goldna frammanundan, og tá tey flyta til fólkapensjón, verður fólkapensjón útgoldin afturúr. Ásett er í stk. 2, at hesir fyritíðarpensjónistar fáa fyritíðarpensjón inn til endan av tí mánaði, sum kemur aftan á, at persónurin røkkur fólkapensjónsaldri.

Dømi um fyritíðarpensjónist, ið røkkur fólkapensjónsaldri í mai mánað
Verandi skipan: Persónurin fær fyritíðarpensjón síðst í apríl, fyri mai mánað. Viðkomandi fær fólkapensjón síðst í mai, fyri juni mánað.
Sambært hesum uppskoti: Persónurin fær fyritíðarpensjón síðst í apríl, fyri mai mánað. Viðkomandi fær eisini fyritíðarpensjón síðst í mai, fyri juni mánað. Síðst í juni fær viðkomandi fólkapensjón fyri juni.

Í praksis fær hesin persónurin sostatt bæði fyritíðarpensjón og fólkapensjón fyri juni mánað. Fyritíðarpensjón fyri juni mánað verður útgoldin síðst í mai, meðan fólkapensjón fyri juni verður útgoldin síðst í juni. Nýggja ásetingin í stk. 3 hevur sostatt við sær, at fyritíðarpensjónistur, sum skiftir til fólkapensjón, ikki verður ávirkaður fíggjarliga. Fyritíðarpensjón er hægri enn fólkapensjón, og tí er broytingin ikki ein fíggjarligur vansi fyri viðkomandi. Eisini skal nevnast, at útgjald sambært løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (Samhaldsfasti) verður útgoldin frammanundan og verður veitt frá fyrsta í mánaðinum, persónur røkkur fólkapensjónsaldri. Sostatt fer persónur, sum t.d. røkkur fólkapensjónsaldri í mai, at fáa bæði fyritíðarpensjón og frá Samhaldsfasta í tveir mánaðir (síðst í apríl mánað og síðst í mai mánað).

Stk. 3.
Stk. 3 ásetir, at persónur, ið hevur útsett útgjaldið av fólkapensjón áðrenn 1. januar 2026, og sum steðgar útsetanini aftan á 31. desember 2025, fær fólkapensjón útgoldna afturúr. Ásetingin er galdandi fyri tey, sum hava rokkið pensjónsaldri, áðrenn 2026, og sum hava útsett útgjaldið av pensjón. Var útgjaldið ongantíð útsett, ella útsetanin steðgar áðrenn 2026, høvdu tey fingið pensjón útgoldið frammanundan. Steðgar útsetanin aftaná 2025, verður pensjón útgoldin afturúr.

Ásetingin merkir, at ein mánað eftir, at útsetanin av pensjón er steðgað, fær viðkomandi fyrsta pensjónsútgjaldið.

Til § 2
Til nr. 1.
Rættindi í sambandi við tillutan og burturfall av viðbót til ávísar pensjónistar er samsvarandi rættindum til veitingar eftir løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Tí er neyðugt at seta nýggjar ásetingar inn í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensionistar.

§ 2, Stk. 3
Nýggjar tillutanir av viðbót til ávísar pensjónistar verða, eins og veitingar eftir løgtingslóg um almannapensjónir o.a., goldnar afturúr. Talan er sostatt um viðbót til ávísar pensjónistar tillutað aftan á 2025.

§ 2, Stk. 4
Rætturin til viðbót til ávísar pensjónistar fellur burtur við endan av mánaðinum, tá pensjónisturin doyr. Hetta verður galdandi fyri allar pensjónistar, sum móttaka viðbót til ávísar pensjónistar.

Ásetingarnar fylgja sostatt ásetingunum í løgtingslógini um almannapensjónir o.a.

Til nr. 2.
Inntøkugrundarlag í sambandi við viðbót til ávísar pensjónistar verður roknað sambært ásetingunum í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Eisini verður í løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar víst til ásetingarnar í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. um umrokning, eftirrokning, afturgjaldskrav o.a. Í sambandi við, at hesar ásetingar í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. verða broyttar, og farið verður burtur frá, at inntøkugrundarlagið er

grundað á ársinntøku til eitt slag av rullandi skipan, er eisini neyðugt at tillaga løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar.

Broytingin í § 3, stk. 1 er ein avleiðing av, at farið verður burtur frá, at tað er seinast uppgjørda ársinntøkan, ið avger rættin til viðbót til ávísar pensjónistar. Higartil galdandi áseting er, at treytin fyri at rætt til viðbót til ávísar pensjónistar er, at pensjónistur ikki hevur hægri ársinntøku enn upphæddirnar, sum standa í § 3. Hetta verður broytt til, at pensjónistur seinastu 12 mánaðirnar ikki skal hava hægri inntøkugrundarlag enn upphæddirnar, sum standa í § 3. Veruliga broytingin er, at "seinastu 12 mánaðirnar" er sett inn.

At "ársinntøka" verður broytt til "inntøkugrundarlag" er ein broyting av tekniskum slag og hevur ikki ávirkan á rættindi hjá pensjónistum. Tá Almannaverkið í dag roknar ársinntøku, er tað í veruleikanum eitt inntøkugrundarlag, sum verður roknað. Sostatt er ársinntøka ikki eitt nóg neyv orð at brúka. Tað eru ikki allar inntøkur, sum verða roknaðar uppí inntøkugrundarlagið. Inntøkugrundarlagið er ásett í § 20 í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

Til § 3
Løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað fyri útgjalding av veitingum frá og við januar 2026. Tó koma § 1, nr. 5 og nr. 7-11 í í gildi 1. januar 2027. Fyri tey, sum eru pensjónistar, tá henda løgtingslógin verður sett í gildi, verður inntøkan undanfarnu 12 mánaðirnar grundarlag undir pensjónsgjaldinum í 2027. Tað merkir, at t.d. í pensjónsútgjaldinum fyri januar 2027 (ið verður útgoldið í endanum av januar 2027) er tað inntøkan í 2026, ið verður brúkt sum grundarlag. Hjá teimum, sum hava verið pensjónistar í styttri enn 12 mánaðir, verður inntøkugrundarlagið umroknað til fult ár.

Tey, sum blíva pensjónistar í januar 2027, fáa eins og allir nýggir pensjónistar fult pensjónsútgjald fyri januar.

Almanna- og mentamálaráðið, 29. september 2025

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Almannaverkið
Fylgiskjal 3: Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 4: Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Fylgiskjal 5: Kommunala Arbeiðsgevarafelagið
Fylgiskjal 6: Landsfelag Pensjónista